# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**124/13** **2013-0175**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 26. juni 2013:** Tikið til eftirtektar.

**125/13** **2013-0143**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 30. mai 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 26. juni 2013:** Framlagt og einmælt goðkent.

**126/13** <u>**2013-0855**</u>

<u>**Lendisgøtur**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vísandi til fund hjá borgarstjóranum við umboð fyri ríðifeløgini, Annu og Óla Rubeksen, tann 15. mars 2013, um lendisgøtur, ríði- og varðagøtur í haganum kring Tórshavnar bý og bygdirnar fyri vestan í kommununi.

Kortskjal varð lagt fram vísandi gøtur í Hoyvíkshaga, Húsahaga, Flatnahaga, og í hagunum vestanfyri til Velbastaðar og Kirkjubøar. Kortið vísti støðuna á ymsu teinunum. 9,1 km av góðum gøtum, 17,5 km av gøtum, ið krevja ábøtur og 2,1 km í uppskoti til nýggjar gøtur.

Anna og Óli tosaðu um eitt nýtt slag av ríðikappingum, -cross country- kappingum, ið eru væl umtóktar í grannalondunum, og um hvussu hetta kundi verið eitt munagott íkast til ferðavinnutilboðini í býnum og øllum Føroyum.

Ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging, og mangt annað um hetta, varð havt á máli.
Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

Góðar lendisgøtur, sum tær kring Vesturvarða og Norðasta Horn, kosta meiri enn 700 kr/m².

Avgjørt varð, at málið skuldi lýsast til fyrstkomandi fund í teknisku nevnd við tilmæli um, at Tórshavnar býráð tekur málið upp, at gera skipanar- og tilgongdarætlan, við atliti at ognarviðurskiftum, brúksrættindum og viðlíkahaldsskyldum fyri nevndu gøtur, og aðrar líknandi gøtur í allari kommununi. At mælt verður til at seta av 1 mill. at byrja arbeiðið við.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at taka undir við omanfyri standandi, at gera skipanarætlan v.m. og at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið til raðfestingar á íløguætlanini, til tess at byrja verkætlanina.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at gera skipanarætlan fyri gøtur í allari kommununi og at beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013: S**amtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 800.000 kr. av konto 6275, framfluttar løgujáttanir og beina málið í býráðið. Málið kemur fyri aftur á komandi fundi við atliti til meirjáttan.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og fyristitingarstjórin mæla til at broyta samtyktina og játta alla upphæddina 1 mió. kr. av konto 8175

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og broyta býráðssamtyktina og játta alla upphæddina 1 mió. kr. av konto 8175, vegir.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0855

**127/13** **<u>2013-0315</u>**

**<u>Vinnuøki á Skarðshjalla</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin greiddi frá um málið viðv. eftirspurningi og kostnaði av liðugtgerð.

**Vinnunevndin 4. februar 2013:** Samtykt at umsitingin kannar kostnaðarmetingina og áhugan hjá møguligum keyparum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**

Á umsøkjara listanum til vinnugrundøkir í Tórshavnar kommunu, standa í løtuni einans 8. umsøkjarar í umhvørvisflokki 3–4 og 5, og sum eisini hava goldið depositum kr. 25.000,00.

Løgdeildin hevur spurt hesar umsøkjarar um teirra áhuga í møguligum keypi av grundstykkjum, sum eru til víddar millum 790 $m^2$ og 2.000 $m^2$ á Skarðshjalla, um stykkini verða seld fyri ein prís sum verður áleið kr. 800 pr. $m^2$

Allir nevndu umsøkjarar hava fingið teldubræv, og hevur løgdeildin hoyrt aftur frá 6 av umsøkjarunum.

Tveir av umsøkjarunum eru áhugaðir, harav tann eini bert er áhugaður um hann kann fáa eitt stykkið sum er til víddar uml. 500 $m^{2.}$

Tveir av umsøkjarunum hava boðað frá, at teir ikki eru ikki áhugaðir, og skulu tveir umsøkjarar hugsa um tað og venda aftur.

Niðurstøðan er at talan er um lítlan áhuga millum verandi umsøkjarar.

Kommunan eigur tó at kanna møguleikan fyri at fremja útstykkingina, og at selja stykkini til marknaðarprís, við einum ásettum minstaprísi.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og at leggja fyri aftur til politiska støðutakan.

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at gera atkomuna lidna.

**Ískoyti:**
Kommunstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at bjóða arbeiðið út og játta neyðugu upphæddina til arbeiðið av konto 6975, ið verður fíggjað av konto 6175, umsiting og røkt av fastari ogn. L61021, søla av jørð. Arbeiðið er mett at kosta kr. 4.730.000,00.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0315

**128/13** **2012-1542**

**Sertannlæknastova í Skúlanum við Løgmannbreyt**

Avtalan við Bergtóru Hanusardóttir um ortodontiviðgerðir sambært lógini um kommunala barna- og ungdómstannrøkt er uppsøgd.

Til tess at skipa eina varðandi kommunala loysn á hesum serstaka parti av virkseminum hjá Tannlæknastovuni, er ætlanin at innrætta klinikk til serviðgerðirnar í tannlæknahølunum í Skúlanum við Løgmannabreyt. Kommunan hevur harumframt sett í starv tannlækna við ortodontiútbúgving, og fer kommunan sostatt at røkja alla hesa tænastuna sjálv.

Til endamálið skal keypast nýggj útgerð. Eisini skulu ávísar hølistillagingar gerast. Talan er um 3 tannlæknastólar við allari tilhoyrandi útgerð, útbúnaði og hølum.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri útgerð og hølistillagingar er beint undir kr. 3 mió v/mvg. Tannlæknaútgerðin og útbúnaður annars er mett til kr. 1.996.237, harav kosta tannlæknastólarnir við útgerð uml. 1,7 mió. Hølistillagingarnar eru mettar til kr. 1.003.000, har størstu postarnir eru timburarbeiði og køkur, innbúgv og HSV-og EL-arbeiði.

Á íløguætlanini fyri 2012 á grein 2 eru kr. 1 mió settar av til at staðseta og byggja tannlæknamiðstøð. Ætlan hevur verið at byggja nýggja tannlæknamiðstøð bæði til vanligu barnatannrøktina og serviðgerðirnar (ortodontiina). Nú ætlanin er at innrætta sertannlæknaklinikk fyri seg, má ætlanin um tannlæknamiðstøð endurskoðast. Mett verður tí, at til ber at nýta hesa upphædd sum part av kostnaðinum at etablera sertannlæknastovuna í staðin.

Skal ætlanin setast í verk, má írestandi fígging kr. 2 mió fáast til vega. Á grein 2 er settar kr. 1 mió av til kommunalar íbúðir. Henda ætlan kann útsetast vísandi til samskiftið, sum er við Húsalánsgrunnin um at byggja luta- og leiguíbúðir. Upphæddin kann tí flytast til sertannlæknastovuna. Aðrar tøkar íløgujáttanir eru ikki á grein 2. Møguleiki er at játta kr. 1 mió av framfluttum løgukarmi kontu 4175 Dagføring av skúlum. Hetta svarar til kostnaðin av teimum tillagingum, ið gerast skulu í skúlahølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á sosialu deild og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at etablera sertannlæknastovu í tannlæknahølunum í Skúlanum við Løgmannabreyt og játta kr. 1 mió av íløgukontu 2375 Tannlæknamiðstøð, kr. 1 mió av íløgukontu 2575 Kommunalar íbúðir, og kr. 1 mió av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum.

**Sosiala nevnd 26.juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at játta 1 mió. kr. til endamálið av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Endaligur byggiroknskapur er nú gjørdur fyri kontu 2375, L23001 Sertannlæknahøli í Skúlanum við Løgmannabreyt.

Byggiroknskapurin vísir eina samlaða nýtslu á kr. 2.675.132,10. Íløgujáttanin var kr. 3.000.000. Staðfestast kann sostatt eitt avlop á kr. 324.867,90.

Íløguverkætlanin skal lokast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at loka verkætlanina konta 2375 (Tannlæknamiðstøð), L23001 Sertannlæknahøli í Skúlanum við Løgmannabreyt, og at avlop kr. 324.867,90 verður flutt yvir á kontu 2275 (læknahølir), L22002 Kommunulæknaskipan.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-1542

**129/13** **2011-2159**

**Viðtaluhølir til 10. og 11. kommunulæknan í Suðurstreymoyar Læknadømi (Víst verður eisini til j. nr. 2010-1937)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Almanna- og heilsumálaráðið játtaði fyri tið síðani at normera 10. og 11. kommunulæknastarvið í Suðurstreymoyar Læknadømi, men bíða hevur verið við at lýsa størvini leys, til kommunan hevði viðtaluhøli til taks.

Umsitingin hevur arbeitt við ymiskum møguleikum og hevur eisini verið í samráðingum við P/f. Miðlon um at leiga høli til 3 læknar á aðru hædd í Miðlon.

Ráðgevi hevur fyri útleigaran latið gera innrættingaruppskot, har serligur dentur er lagdur á møguleikar til samstarv, fakligt umhvørvi og felagsfunktiónir. Uppskotið hevur støði í høliskrøvunum sambært kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkhald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum; álitinum um nýggja kommunulæknaskipan handað landsstýrismanninum í heilsumálum í desember 2010, har serligur dentur er lagdur á, at kommunulæknaviðtalur skulu skipast í størri eindir; og ráðgeving frá lækna um arbeiðsgongdir v.m.

Leigukostnaðurin er kr. 980 um árið. Umbyggingarkostnaðurin er mettur til kr. 3.665.500, og verður afturgoldin yvir eitt ávíst áramál.

Talan er um stórt leigumál. Mett verður tí skilabest at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika at leingja hann. Mett verður eisini skilabest, at umbyggingarkostnaðurin verður afturgoldin yvir 10 ár.

Støða verður seinni tikin til, hvørjir læknar skulu fáa í boðið at flyta inn í Miðlon. Ætlanin er at kommunulæknin, sum hevur viðtaluhølir í J. Paturssonargøtu, eisini flytir í Miðlon.

Samlaður árligur kostnaður verður við hesum:

| | | |
|---|---|---|
| Leigukostnaður | kr. | 637.980 |
| Umbyggingarkostnaður v/mvg | kr. | 366.550 |
| | kr. | 1.004.530 |

Leigukostnaðurin verður prístalsviðgjørdur. Neyðugt er við hægri játtan til kommunulæknaskipanina í 2012.

Heilsumálaráðið hevur givið endaliga váttan fyri, at tveir kommunulæknar verða settir afturat í Suðurstreymoyar Læknadømi, tá hølir verða tøk til tess – tó í fyrsta lagi 1. desember 2011.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára sáttmála við P/f. Miðlon um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Sosiala nevnd 20.september 2011: Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 26. september 2011: Útsett til nærri kanningar.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og gera 10-ára leigusáttmála um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar.

**Býráðið fyri læstum hurðum 20. oktober 2011:** Samtykt at samráðast um 10-ára leigusáttmála um høli til tríggjar kommunulæknar, tó við teirri treyt at prísurin verður lægri enn tann í fyriliggjandi uppskoti.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst bæði um leigukostnað og innrættingina. Leigumálið er til 3 kommunulæknar. Samlað er talan um 651 fermetrar, og fermetraprísurin er lækkaður til kr. 970. Árliga leigan verður 1. januar á hvørjum ári javnað samsvarandi prístalinum.

Mett verður, at parturin hjá kommununi at gjalda fyri at gera hølini klár er kr. 2,5 mió, tvs. ein fermetrakostnaður á kr. 3.840, sum mett verður er á hóskandi støði. Kommunan setir sum treyt, at útleigarin rindar møguligan kostnað, sum er omanfyri kr. 2,5 mió. Í hesum sambandi skulu lógar-, góðsku- og haldføriskrøv ásetast, og kommunan fáa byggiroknskap skjalprógvaðan.

Upprunaætlanin var at fíggja innrættingina yvir rakstur. Við at fíggja arbeiðið sum íløga, er samlaði kostnaðurin fyri 10 ára skeiðið munandi lægri. Á grein 2 er tó eingin íløgujáttan tøk til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára leigusáttmála við hesum treytum, og at játtaðar verða kr. 2,5 mió sum íløga at fíggja innrættingina.

**Sosiala nevnd 15. november 2011:** Ein meirluti, Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at fáa til vega játtan til íløguna.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Vagnur Johannesen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og játta 2.500 tkr. av konto 2210 av íløguætlanini fyri 2012.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 24. november 2011:** Bogi Andreasen fór av fundi meðan mál nr. 257/11 varð viðgjørt.

Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini 16. november 2011, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

**Ískoyti**
Kommunan hevur sambært løgtingslóg um kommunulæknaskipan § 7 skyldu at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknar. Í kunngerð um støði, viðlíkahald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum § 4 verður er neyvari ásett, hvørji tól, amboð og innbúgv viðtaluhøli skulu hava.

Í íløguætlanini fyri 2012 eru settar kr. 950.000 av til kommunulæknaskipan konta 2775, L22002.

1. Innbúgv
Kontrast arkitektar hava staðið fyri útboði av innbúgvi. Úrslitið var hetta:

| | Tilboð | Alternativt tilboð |
|---|---|---|
| Inventartænastan | kr. 471.654,00 | kr. 361.526,00 |
| Blika | kr. 498.339,00 | kr. 528.539,00 |
| Idé Møblar | kr. kr. | |
| Nema | kr. 473.495,00 | kr. 414.975,00 |
| Byggitilfar | kr. 373.190,00 | kr. |
| Eikin | kr. kr. | |

Eftir gjøgnumgongd av innkomnu tilboðunum metir Kontrast arkitektar, at alternativa tilboðið hjá Nema er besta boðið bæði í mun til prís og dygd. Mælt verður til at taka av hesum tilboðnum. Sagt verður víðari, at næstbesta tilboðið prís í mun til dygd er tilboðið hjá Byggitilfar, meðan mælt verður frá lægsta tilboðnum hjá Inventartænastuni, sum ikki er eit dygdargott tilboð heldur ikki í mun til snið.

Brúkarabólkurin, tað er kommunulæknarnir í Miðlon, mæla til at taka av alternativa tilboðnum hjá Nema kr. 414.975.000.

2. Læknaútgerð
Umsitingin hevur heintað tvey tilboð inn uppá læknaútgerð.

| | |
|---|---|
| Seelen Care | kr. 271.521,37 |
| Blika | kr. 341.343,05 |

Brúkarabólkurin mælir til at taka av tilboðnum hjá Seelen Care.

3. KT-útgerð
KT-deildin hevur heintað tilboð uppá telduútgerð.

| | |
|---|---|
| Formula | kr. 111.495,00 |
| Nema | kr. 124.145,00 |
| Elektron | kr. |

KT-deildin mælir til at taka av tilboðnum frá Formula kr. 111.495.

Harumframt hevur KT-deildin heintað inn tilboð frá Føroya Tele um telefonútgerð. Tilboðið er kr. 47.495,00.

Samlað tilboð við støði í tilmælunum omanfyri:

| | |
|---|---|
| Innbúgv Nema | kr. 414.975,00 |
| Læknaútgerð Seelen Care | kr. 271.521,37 |
| Telduútgerð Formula | kr. 111.495,00 |
| Telefonútgerð Føroya Tele | kr. 47.495,00 |
| Í alt u/mvg | kr. 845.486,37 |

Við mvg 6,25% verður kostnaðurin kr. 898.329,27.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á sosialu deild mæla til at taka av omanfyri nevndu tilboðum frá Nema kr. 414.975,00, frá Seelen Care kr. 271.521,37, frá Formula kr. 111.495,00, og frá Føroya Tele kr. 47.495,00.

**Sosiala nevnd 21.august 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Ráðgevin Mayfinn Norðoy greiddi frá útbjóðingini av innbúnum.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, mælir til at taka undir við tilmælinum tó soleiðis, at í mun til innbúgvið verður mælt til at taka av tí lægsta tilboðnum hjá Inventartænastuni.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, at kommunan ger reglugerð um útbjóðing av innbúgvi og líknandi útgerð, sum ikki er fevnt av lisitatiónslógini.

**Býráðið 13. september 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Vagnur Johannesen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jan Christiansen, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen.

**Ískoyti:**
Endaligir byggiroknskapir eru gjørdir fyri báðar íløgusamtyktirnar í hesum máli, konta 2275, L22002 Kommunulæknaskipan (innbúgv, útgerð v.m.) og konta 2275, L22003 Læknahøli (umbygging).

Byggiroknskapurin fyri L22002 vísir eina samlaða nýtslu á kr. 1.281.213,40. Íløgujáttanin var kr. 950.000. Staðfestast kann sostatt ein meirnýtsla á kr. 331.213,40.

Byggiroknskapurin fyri L22003 vísir eina samlaða nýtslu á kr. 2.500.000. Íløgujáttanin var kr. 2.500.000. Staðfestast kann sostatt, at upphæddirnar javnviga.

Íløguverkætlanirnar skulu lokast. Til ber at fíggja meirnýtsluna frá kontu 2375, L23001 Sertannlæknahøli í Skúlanum við Løgmannabreyt (sí mál 2012-1524 at loka) við kr. 324.867,90, og frá rakstrarkontu 2210 Kommunulæknaskipan kr. 6.345,50.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at loka konturna 2275, L22002 Kommunulæknaskipan og 2275, L22003 Læknahøli, og at figgja staðfestu meirnýtsluna sum omanfyri víst.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2011-2159

**130/13** **2009-2549 BAM**

**Kommunala Brennistøðin: Endurnýggjan av ketlinum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ketilin á KB er frá 1987, og er nú sostatt umleið 22 ára gamal. Partar av ketlinum vórðu skiftir í 1989, vegna framleiðslufeil. Livitíðin á einum ketli er natúrliga avmarkað, tó uttan at til ber við vissu at siga, hvussu long livitíðin er.

Í 2006 varð ovnurin høvðusumvældur, eins og framkomin roykreinsiskipan varð bygd. Ímillum hesar báðar høvðuspartar er triði høvuðspartur í annlegginum, nemliga ketilin, sum einki varð gjørt við í.s.v. høvuðsumvælingina.

**Grundarlag og uppgávulýsing**
KB hevur seinastu árini gjørt kanningar og metingar fyri at kunna finna fram til røttu loysnina og røttu løtuna at endurnýggja ketilin. Grundarlagið ella fortreytirnar fyri kanningunum og metingunum eru hesar "uppgávulýsingar":

- At aldur og slit á ketlinum viðføra:
  - Rakstrarsteðgir vegna umvælingar, sum minka um tøka brennitíð
  - Brenniorkan minkar, tá ið rør verða proppað vegna lekar
  - Um illa vil til, kunnu álvarsamir feilir leggja annleggið lamið í longri tíð
- At tekniskir trupulleikar eru við rakstrinum av filtrinum, vegna ov høgan hita á roykinum úr ketlinum.
- At núverandi ketil krevur manuella reinsing umleið 10. hvønn dag. Hetta ber til, við niðursettari last, men minkar um brennitíðina og harvið mongdina, sum kann brennast.
- At annleggið verður fyrireikað tekniskt og í mun til brenniorku til eina hóskandi restlivitíð, soleiðis at gjørdar íløgur í ovn og filtur verða gagnnýttar sum longst.

Viðv. 1: Aldur og slit.
Seinastu árini eru hesar uttanhýsis kanningar av ketlinum gjørdar (j.nr. 2009-2549/1):

- 2004: Babcock & Wilcox Vølund : Tilstandsrapport
- 2006: Force Technology: Ultrasonic Thickness Examinination (IRIS)
- 2008: Babcock & Wilcox Vølund : Inspektions- og tykkelsesmålerapport

Kanningin frá 2004 vísti, at ketilin sum heild er í góðum standi, men at innanfyri eitt tíðarskeið á uml 6 ár kann roknast við at rørini skulu skiftast.

Í kanningin frá 2006 varð tjúktin á rørunum máld við stikkroyndum (54 av 414 rørum). Minst málda rørtjúkd var 2,8 mm.

Í kanningini frá 2008 vórðu eisini gjørdar tjúkdarmátingar (stikkroyndir), og minst málda rørtjúkd var 2,8 mm. BWV metti tá, at ketilin var í sera góðum standi, og at vænta, at ketilin kann vera í rakstri í nøkur ár aftrat (einki áramál "garanterað"!). Mett varð, at neyðugt er ikki at skifta rørini í løtuni.

Seinastu árini hava nakrir lekar verið á ketlinum. Serliga seinasta árið hava fleir lekar verið. Hesir lekar benda á, at livitíðin nú er avmarkað til rættiliga fá ár aftrat. Tað serliga við slíkum trupulleikum við eldri ketlum, ið byrja at leka er, at lekar koma títtari og títtari fyri, og bráddliga kann støðan gerast álvarsom.

Kommunala Brennistøðin hevur heitt á Rambøll um, við støði í gjørdu kanningunum, at meta um støðuna og livitíðina hjá ketlinum (j.nr. 2005-2549/9). Teirra niðurstøða er, at livitíðin er fá ár, og at 5 ár ikki kunnu garanterast.

Tekniski leiðarin og rakstrarleiðarin á KB hava sjálvsagt eisini loypandi mett um støðuna á ketlinum, sí frágreiðing tekniska leiðarans (j.nr. 2009-2549/10). Teirra meting og niðurstøða er, at livitíðin er avmarkað til 3-5 ár aftrat, og at renovering má vera byrjað innan 3 ár. Í frágreiðingini verður eisini sagt, at 2% av rørunum eru proppað vegna lekar, umframt at aðrir lekar hava verið. Proppaðu rørini viðføra minni kapacitet á ketlinum, hægri roykhita, sum aftur gevur trupulleikar í filtrinum.

Viðv.2: Tekniskir trupulleikar við rakstrinum av filtrinum

Hitin á roykinum frá ketlinum er í hægra lagi, í mun til raksturin av roykreinsiskipanini. Neyðugt er at sproyta nógv vatn inn í roykin fyri at køla, og tað vísir seg at vera sera trupult tekniskt at fáa hetta at rigga nóg væl. Úrslitið gerst, at øska byggist upp í konditioneringstorninum, sum at enda kann loypa niður og steingja fyri roykrásini, og tað er ein sera álvarsom støða, tí heitu roykgassini sleppa ikki burtur vanliga vegin, men mugu út gjøgnum op o.t. í ovninum.

Hetta viðførir

- Rakstrarsteðg (mist brennitíð)
- Yvirupphiting av ketli og ovni, sum aftur er orsøk til at ketilin verður termiskt belastaður og harvið slítist meira
- Dálking av ovnhøll og filturhøll

  Fyri at loysa hendan trupulleika er neyðugt at lække hitan á roykinum frá ketlinum, og tað kann gerast antin við einum størri ketli ella við einum "economisara" millum ketilin og filtrið.

Viðv. 4:

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini heldur, at rættast er at gagnnýta gjørdu íløgurnar í 2006 sum longst, áðrenn eitt heilt nýtt annlegg verður bygt. Í hesum sambandi eru tvey ymisk tíðarskeið (planperiodur) mett, eitt stutt (5-10 ár) og eitt longri (12-18 ár). Væntast kann, at nøgdirnar at brenna økjast líðandi við tíðini, og tí er neyðugt at fremja tiltøk, sum kunnu økja um brenniorkuna, fyri at kunna nøkta tørvin, sum verður mettur til minst 20.000 T/ár í longra tíðarskeiðnum. Somuleiðis er væntandi, at brennivirðið økist komandi árini, og ávirkar hetta brenniorkuna negativt.

**Loysnir**

Kommunala Brennistøðin hevur í samráð við Rambøll biðið veitaran av annlegginum Babcock & Wilcox Vølund um at koma við uppskotum til loysnir og kostnaðarmetingum

uppá áður nevndu "uppgávulýsingar". Rambøll hevur síðani mett um hesi uppskot og skrivað eitt notat við tilmæli um hvørja loysn Rambøll metir vera ta bestu.

Uppskotini til loysn eru hesi (sí uppskotini í síni heildí málinum, j.nr. nevnd niðanfyri, eins og meting hjá Rambøll, j.nr. 2009-2549/9):

- **Renovering av verandi ketli** (útskifting av roykrørum), j.nr. 2009-2549/3:
  *Uppskot 1 er einans ein stuttskygd høvuðsumvæling av ketlinum (styttra tíðarskeiðið, 10 ár), men loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, ella við manuellu reinsingini av rørunum. Partar av ketlinum verða ikki skiftir, og er tí framvegis eins gamal og áður. Loysnin gevur ikki øktan kapacitet. Við hækkandi brennivirði kann væntast, at brenniorkan fellur til 15.000 T/ár. Orkuframleiðslan verður ikki økt.*
  *Kostnaðarmeting: 2,0 mió. (Rambøll).*

- **Innseta Economisara millum ketil og filtur**, j.nr. 2009-2549/6:
  *Uppskot 2 loysir trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, umframt tað sum er nevnt undir uppskot 1. Brenniorkan kann við hesi loysn økjast við 1000 T/ár. Orkuframleiðslan verður økt umleið 10-15 %.*
  *Kostnaðarmeting: 7,5 mió, íroknað uppskot 1, renovering av ketli. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu**, j.nr. 2009-2549/4:
  *Uppskot 3 loysir trupulleikan við ov høgum roykhita til filtrið, men ikki manuellu reinsingina av rørum. Allur ketilin verður skiftur. Brenniorkan verður økt til 20-22.000 T/ár, sjálvt við hækkandi brennivirði. Orkuframleiðslan verður økt 10-15%. Loysnin kann nýtast til longra tíðarskeiðið.*
  *Kostnaðarmeting: 10,0 mió. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan vatnrørsketil**, j.nr. 2009-2549/5:
  *Uppskot 4 loysir nevndu trupulleikar við ov høgum roykhita til filtri og manuellu reinsingini av ketlinum. Brenniorkan kann økjast til 24.000 T um árið. Orkuframleiðslan verður økt. Við 10% størri íløgu kann Brenniorkan økjast til 30.000 T, um ovnurin seinni verður um- og útbygdur. Kostnaðarmeting: 30.0-35.0 mió. (Rambøll).*

**Niðurstøða og tilmæli hjá Rambøll:**
Rambøll mælir til, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) verður vald. Hendan loysnin lýkur krøvini til brenniorkutørv í longru planperioduni (12-18 ár), eins og hendan loysnin loysir mest átrokandi trupulleikan við ov høgum hita til filtrið.

**Meting og niðurstøða hjá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.**

| Loysn | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| 1 | - Lágur kostnaður<br>- Stutt umbyggingartíð (2-3 vikur) | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið |

| | | |
|---|---|---|
| | | - Manuell reinsing neyðug<br>- Økir ikki um brenniorkuna.<br>- Økir ikki um orkuframleiðsluna.<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna |
| 2 | - Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist (eitt sindur)<br>- Orkuframleiðslan økist eitt sindur (FHF)<br>- Stutt umbyggingartíð (3-4 vikur) | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna<br>- Ein eyka partur, sum ikki er kendur frammanundan, skal byggjast inn í skipanina.<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 3 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist<br>- Orkuframleiðslan økist (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 4 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Ikki neyðugt við manuellari reinsing<br>- Brenniorkan økist nógv<br>- Orkuframleiðslan økist nógv (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Kostnaðurin ov høgur í mun til nyttuna<br>- Ketilin er stórur (høgur) og krevur bygningsbroytingar<br>- Ketilin er torførari at reka, tí hann er meiri avanseraður. Umbyggingartíð 3-4 mánaðir.<br>- neyðugt við eyka kølikapaciteti |

Samanumtikið metir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) er nógv tann besta loysnin, sæð í mun til kostnaðin og nyttuna, tá talan um um bæði styttru og longru planperioduna.

Vísandi til, at livitíðin á ketlinum verður mett at vera avmarkað til 3, kanska 5 ár enn, mælir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at arbeiðið at endurnýggja ketilin eigur at vera gjørt í 2011. Tað er ikki rætt at bíða sum longst, grundað á hesi viðurskifti:

- vandi er fyri, at sum tíðin gongur, fer ketilin at leka meira, harvið koma rakstrarsteðgir, rør mugu proppast, og kapaciteturin fellur, og hitin hækkar til filtrið, sum fær enn størri trupulleikar
- Útskiftingin má ikki draga út, so at tað bráddliga gerst neyðugt at útskifta heil rørbunt ella øll rørini, beint frammanundan at ketilin skal útskiftast.
- Tað er best at fáa gjørt endurnýggjanina meðan rusknøgdirnar eru minst, og tað er í krepputíðum, annars vaksa rusknøgdirnar gjarna fyri hvørt ár sum gongur.
- Ein nýggjur ketil heldur gjarna í umleið 20 ár, og verandi annlegg verður neyvan í rakstri longri enn tað, og fyri at gagnnýta ein nýggjan ketil mest møguligt, ræður um at fáa hann í rakstur sum skjótast.

Framleiðslutíðin av einum nýggjum ketli er umleið 6-8 mánaðir, harumframt kemur tíð til planlegging, sáttmálasamráðing við veitara o.t. á umleið 6 mánaðar, so samanlagt tekur verkætlanin umleið 1-1,5 ár at fremja.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at tikið verður undir við at uppskot nr. 3 (Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu) verður valt, og at útskiftingin verður gjørd í 2011. Samstundis verður mælt til, at nevndin tekur upp spurningin um fígging sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar, soleiðis at fyribils kr. 10,0 mió. u/mvg verða tøkar til útskifting av ketlinum í 2011.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina spurningin um fíggingina í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Umrøtt, og verður viðgjørt í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Ískoyti:**
Síðani málslýsing og tilmæli í hesum máli bleiv gjørt á heysti 2009, hevur brennistøðin á Bornholm, ið er nærum meinlík brennistøðini á Hjalla, havt útbóð og gjørt sáttmála um tekniska dagføring av støðini, herundir eisini ketlinum. Framleiðsla av nýggjum ketli til Bornholm er nú í gongd, og verður hann skiftur í september 2011.

Ráðgevi hjá BOFA var Rambøll, sum sostatt hevur nýggjar dagførdar upplýsingar viðvíkandi tekniskum loysnum og kostnaðum. Við støði í nýggju dagførdu upplýsingunum hevur Rambøll gjørt eina dagføring av notatinum frá september 2009, eins og nýtt tilmæli er gjørt, j.nr. 2009-2549-13.

Royndirnar frá útbjóðingini á Bornholm vísa at tann áður tilmælta loysn 3 er nú mett at kosta kr. 13 mió., í mun til áður mett kr. 10 mió.

Útbjóðingin vísti eisini, at at tað er gjørligt at fáa ein vatnrørsketil (loysn 4) fyri umleið kr. 16 mió., í mun til áður mett kr. 30-35 mió, og sum ikki krevur stórar bygningsbroytingar, sum áður hildið. Í fyrra notatinum var júst tikið fyrivarni fyri, at óvissan í.s.v. kostnaðurmetingin av hesi loysnini var størri enn viðvíkjandi hinum loysnunum, serliga tí loysnin varð mett at krevja bygningsbroytingar, og tí at neyðugt var við neyvum tilboðum frá veitarum av ketlum. Henda loysnin samsvarar einum nýmótans forbrenningsketli.

Grundað á hesar dagførdu upplýsingarnar, mælir Rambøll til, at velja loysn 4, sum er útskifting av ketlinum til ein vatnrørsketil, soleiðis sum gjørt er á Bornholm.

**Tilmæli:**
Grundað á nýggju upplýsingarnar í málinum, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini nevndini til at:

- Velja at fremja loysn 4, sum er útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil eins og gjørt er á Bornholm og
- Heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at raðfesta játtan á umleið kr. 16 mió. (u/mvg) til ketil, umframt umleið 0,5 mió. til ráðgeving á íløguætlanini, soleiðis at ketilin kann bíleggjast, skiftast og verða tikin í nýtslu innanfyri í mesta lagi 2 ár.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 0,5 mió. kr. av konto 7175, renovasjón (íløgur), til ráðgeving og útbjóðing.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmáli um heildarráðgeving, í sambandi við útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil, verður í næstum gjørdur við ráðgevarafyritøkuna Rambøll.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðini mæla, við grundarlagi í fylgiskjali 1 í ráðgevarasáttmálanum, j. nr. 2009-2549/18, til, at arbeiðið, at gera ketilin, verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
TK hevur móttikið 1. uppskot til útbjóðingartilfar uppá ketilin frá Rambøll, j.nr. 2009-2549/20. Samandráttur av útbjóðingartilfarinum og tilmæli frá Rambøll um útbjóðingarhátt og ketlaveitarar, verður sent limunum saman við skránni. Umsitingin hevur gjørt ymsar viðmerkingar til tilfarið, j.nr. 2009-2549/21.
Týdningarmestu høvuðstáttirnar í útbjóðingartilfarinum eru:

- Útbjóðingarháttur: Undirhondsboð sambært donsku ”tilbudsinhentningsloven” (Løgdeildin er biðin um at kanna/viðmerkja løg-grundarlagið)
- Grundarlag fyri tillutan av ordra: ”Det økonomisk mest fordelagtige tilbud” sambært donsku ”tilbudsindhentningsloven”.
- Metingarstøði undir ”Det økonomisk mest fordelagtige tilbud”:
  - Pris 60 Point
  - Teknisk kvalitet 30 Point
  - Tidsplan for færdiggørelse af leverancen 10 Point
  - Maksimum pointantal 100 Point
- Høvuðspunktir í uppksoti til tíðarætlan (kann samráðast um partar av tíðarætlan sambært útbjóðingartilfari):
  - 01/07-2012: Útbjóðingartilfarið sendast út
  - 31/08-2012: Tilboðsfreist
  - 01/11-2012: Undirskriva sáttmála
  - 15/07-22/09: Installatión / uppstart
  - 23/09-23/12: Royndarkoyring
  - 23/12-2013: Fyribils yvirtøka
- Uppskot til gjaldsætlan (kann samráðast sambært útbjóðingartilfari):
  - 1. rata (við ordra): 01/11-2012: 20% av sáttmálaupph.
  - 2 .rata (veitan av komponentum) 15/07-2013: 30% av sáttmálaupph.
  - 3 .rata (start royndarkoyring) 23/09-2013: 40% av sáttmálaupph.
  - 4. rata (fyribils yvirtøka) 23/12-2013: 10% av sáttmálaupph.

Umframt veitingina av ketlinum, sum ketlaveitarin skal veita sambært umrødda útbjóðingartilfari, verða aðrar neyðugar byggiharraveitingar umfataðar av samlaða projektinum: Byggiharraveitingarnar eru í høvuðsheitum:

- Niðurtøka av verandi vatnkøliskipan og tilhoyrandi útgerð (s.s. kølarum)
- Gera rørgrøv fyri rørum til Fjarhitafelagið
- Veitan og uppsetan av vatnrørum frá bygningi og yvir til Fjarhitafelagið (og retur)
- Gera fundamentir til nýggjar kølarar og rørberarar
- Inniloka verandi kølaraøki, sum verður neyðugt at nýta til maskinútgerð (leggja tak á, skera hol í betongvegg fyri dupulthurð inn til verandi ketilrúm, seta hurðar og vindeygu í, og møguliga innbyggja hems/stáldekk við trappu)
- Møguliga nýtt trýstluftannlegg (sum eisini er optión í ketlaveitingini)
- Neyðugt verður helst eisini at gera nýggja El-innlegging til Jarnplássið, soleiðis at skrottpressan verður tikin av høvuðs el-talvuni á Brennistøðini, fyri at fáa nóg mikið av tøkum el-mátti á talvuna.

Til tess at kunna byrja fyrireikan av nøkrum av omanfyristandandi byggiharraveitingum, sum skulu samskipast við ketlaveitingina, hevur leiðslan á KB mett tað verið neyðugt at fáa gjørt visuellar skitsur av nýggju vatnkøliskipanini og tilhoyrandi útbúnaði (s.s. staðseting av kølarum, pumpum og kompressarum).

Skitsurnar verða ætlandi latnar ketlaveitarunum sum vegleiðing um, hvussu KB ynskir at køliskipan og komponentar verða staðsettir, og av tí at tær skuldu verða lidnar samstundis sum útbjóðingartilfarið, vóru ikki stundir at leggja mál um serstaka játtan fyri nevnd til støðutakan, áðrenn tær vóru bílagdar.
Skitsurnar eru gjørdar av Sofus M. Jacobsen, ráðgevandi verkførðingi, og vóru av SMJ mettar at kosta 40-50.000 kr. Leiðarin á KB metir ikki, at gerð av tílíkum visuellum skitsum eru partar av arbeiðnum hjá Rambøll, og tí verður biðið um at peningur verður játtaður til hetta arbeiðið av íløgum innan renovatiónsøkið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu brennistøðini mæla til at:

- góðkenna útbjóðingartilfarið við viðmerkingum, sum umsitingin ger
- bjóða veitingina av ketlinum út sambært tilmælta útbjóðingarháttinum og til teir veitarar, sum Rambøll mælir til
- góðkenna uppskot til tíðaræltlan og gjaldsætlan og samstundis fyrireika úutvegan av neyðugari játtan til 1. ratugjald, sum er 20% av sáttmálaupphædd (upphæddin er ikki kend enn, tí tilboð fyriliggja ikki, men verður væntandi um 2-3 mió. kr.), sum skal gjaldast 1. november 2012.
- játta kr. 60.000 + mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.
- beina málið um fíggjarnevnd í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Bárður Michelsen, leiðari á kommunalu brennistøðini, kunnaði um útbjóðingartilgongdina.

Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Jan Christiansen og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 60.000 umframt mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Tilboð uppá útskifting av ketlinum og tilhoyrandi skipanum frá báðum veitarunum DPCT ávíkavist B&W eru móttikin tann 31/8-2012. Bæði tilboðini lógu væl hægri enn mett. Tískil varð í tveimum umførum roynt at fáa nýggj og endurskoðaði tilboð frá báðum veitarunum, fyri at kanna møguleikar fyri at fáa lækkað kostnaðin. Seinastu tilboðini vórðu móttikin ultimo nov./primo des. 2012, men úrslitið av royndunum broytti ikki munandi uppá prísin, meðan góðskan á veitingini lækkaði munandi. Hóast DPCT hevur funnið sparingar fyri ávíkavist áleið 1,5 og 2,5 mió., eru seinnu tilboðini tí minni áhugaverd enn tey fyrstu.

Víst verður til j.nr 2009-2549-44, sum er notat frá ráðgevaranum RAMBØLL *"Beslutningsnotat efter gennemgang af tilbud for renovering af TKKF's kedel og tilhørende udstyr"*, dagfest 20-01-2013, fyri eina neyva lýsing av útbjóðingargongdini, lýsing og sammeting av tilboðunum, grundgevingum fyri niðurstøðu og tilmæli um víðari framferð.

Niðurstøðan og tilmæli í nevnda notati er, at arbeiða víðari við tilboði 1 frá DPCT, sum verður mett at vera tað besta tilboðið, út frá einum heildarsjónarmiði grundað á teknisk, fíggjarlig og ábýrgdarviðurskifti (ábyrgd av samskipan, projekt- og byggileiðslu, processábyrgd, garantiskyldur), umframt at hetta tilboðið gevur bestu samlaðu framtíðartryggjaðu loysnina.

Tilboðini frá hinum veitaranum B&W eru væl hægri enn tilboðini frá DPCT á felags sammetingargrundarlagi, og tískil verður mælt til í fyrsla lagi at arbeiða víðari við DPCT.

Rambøll vísir á møguleika fyri at fremja útskiftingina yvir 2 fíggjarár (2013 og 2014), og hevur gjørt uppskot til tíðarætlan og cash-flow í hesum sambandi (í áðurnevnda notati, j.nr. 2009-2549/44).

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting av øllum projektinum, j.nr. 2009-2549/45. Samlaður kostnaður fyri øll arbeiðir í.s.v. útskiftingina av ketlinum og tilhoyrandi skipanum, verður sambært kostnaðarmetingini kr. 28,7 mió. u/mvg ella 30,4 mió. v/6,25 % mvg. Í 2011 og 2012 er játtað í alt kr. 0,564 mió. Av tí at ávísir partar av arbeiðnum (múrverksarbeiði og útskifting av skakt) kann metast sum viðlíkahald/rakstur, verður mælt til at fíggja hesar partar av rakstrinum hjá KB. Tískil verður samlaði tørvurin at fíggja av íløgum kr. 29,034 mió. v/6,25 % mvg.

**Viðmerking frá Brennistøðini.**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini tekur undir við niðurstøðuni og tilmælinum frá Rambøll, um at tilboð 1 frá DPCT er besta tilboðið og at hendan "totala" loysnin samlað sæð er tann besta loysnin fyri Brennistøðina og Tórshavnar kommunu. Loysnin er teknisk góð, viðførir betri plássviðurskifti, betri arbeiðsumhvørvi og er ein framtíðartryggjað heildarloysn, sum einans fæst við at fremja alla loysnina undir einum.
Sera týdningarmikið er eisini, at í mun til seinnu tilboðini eru viðurskiftini í fyrsta tilboðnum viðvíkjandi processábyrgd, koordinerings- og projektleiðsluábyrgd, og garantiábyrgd greiðari og tryggari.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Avgerðin hjá heilsu- og umhvørvisnevndini 27. sept. 2011 tók støði í kostnaðinum av eini loysn, sum varð framd á einari brennistøð á Bornholm, sum er meinlík henni hjá Tórshavnar kommunu. Tað hevur tó víst seg, at veitarin hevur undirmett kostnaðin av ketilsloysnini á Bornholm, sum gjørdist munandi hægri. Tilboðið, sum Tórshavnar kommuna hevur fingið, svarar sambært Rambøll væl til tann kostnaðin, sum ketilin á Bornholm skuldi havt kostað. Tað er tískil púra ósannlíkt, at kommunan kann fáa eina loysn sum liggur nærhendis tí kostnaðinum, sum tað tá var mett at koma at kosta, at utskifta ketilin. Tilboðini geva eisini týðiliga ábending um tað.

Hetta broytir tískil fíggjarligu fortreytirnar munandi.

Málið um endurnýggjan av ketlinum varð reist í 2009, við tilmæli um at skifta ketilin í 2011. Fíggjarnevndin samtykti 18. november 2009 at viðgera tað í sambandi við langtíðaríløguætlanina. Útskiftingin bleiv tó útsett og ikki gjørd í 2011, orsakað av øðrum átrokandi íløgum.

Hóast kostnaðurin nú kortini vísir seg at gerast áleið tann sami, sum mett varð av Rambøll í 2009, (j.nr. 2009-2549/9), so er veruleikin tann, at kommunan hevur ikki nakað veruligt val, tí verandi ketil kann bert koyra í stutta tíð afturat, og gerst minni og minni effektivur, so hvørt sum alt fleiri og fleiri rør verða "proppaði" vegna lekar, eins og útskiftingin longu er útsett. Ketilin er frá 1987, og er nú sostatt 25 ára gamal.

Á fíggjarætlanini fyri 2013 eru avsettar kr. 10 mió. til útskiftan av ketli á Brennistøðini.

Neyðugt er tí hjá býráðnum at viðgera málið við atliti til eina tekniska og eina fíggjarliga loysn, og kann umsitingin í hesum sambandi vísa á hetta sum ein møguleiki:

1. At projektið verður framt yvir 2 fíggjarár (2013 og 2014), við einum íløgukarmi í alt á kr. 29,034 mió. íroknað 6,25% mvg,
2. At játtaðar verða kr. 10 mió. av íløgum fyri renovatión 2013, konto 7175
3. At játtaðar verða kr. 19,034 mió. av íløgum fyri renovatión í 2014, kto 7175.

Av øðrum møguleikum sum kunnu umhugsast er lántøka ella at gera eina avgjaldsavtalu við veitaran. Í báðum førum koma rentuútreiðslur afturat, sum ikki eru íroknaðar omanfyri nevnda fíggjartørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur málið um fígging upp til politiska viðgerð.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Ásannandi at tað er átrokandi at fáa eina loysn, mælir nevndin til at játta kr. 10 mió. av íløgum í 2013 og at avsettar verða kr. 19,1 mió. á íløguætlanini fyri 2014 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Somuleiðis samtykti nevndin at mæla til, at umsitingin og ráðgevin fáa heimild at taka upp samráðingar og gera sáttmála um besta tilboðið, áðrenn tilboðsfreistin gongur út 31. mars 2013.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at heimila umsitingini og ráðgevanum at taka upp samráðingar við atliti til at gera sáttmála, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Samráðingar um sáttmála við DPCT vóru hildnar ultimo februar við Rambøll sum okkara samráðingarráðgeva. Semja varð funnin um nærum øll evni, og bert smálutir restaðu í at fáa uppá pláss eftir fundin. Við støði í samráðingunum var DPCT somuleiðis sinnað at lækka kostnaðin nakað, og var endaligur kostnaður upplýstur av umboði fyri DPCT eftirfylgjandi.

DPCT fór tó í likvidatión 28/2. Síðani hevur Rambøll loypandi haft samband við umboð fyri búgvið, og vóru ábendingar um eina danska yvirtøku/rekonstruktión av felagnum

Medio apríl komu boð um, at Danstoker A/S hevur yvirtikið partar av búnum eftir DPCT, og at fyritøkan vil halda áfram sum eitt dóttirfelag hjá Danstoker við navninum Boilerworks A/S, sum eisini var gamla navnið á fyritøkuni.

Fyrst í mai bað Danstoker/Boilerworks um fund við TK/Rambøll um projektið, sum DPCT hevði givið tilboð uppá, og sum Danstoker sigur hóskar til framtíðar strategi felagsins.

Fundur við Danstoker/Boilerworks varð hildin á høvuðssætinum hjá Danstoker í Herning tann 23/5 (j.nr. 2009-2549/51). Niðurstøðan á fundinum var, at samráðingarúrslitið við DPCT, herundir endaligi kostnaðurin á kr. 23,1 mió., ið var upplýstur av umboðum fyri DPCT eftirfylgjandi, verður grundarlag fyri sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Boilerworks A/S um endurnýggjan av ketlinum.

Avtalað var, at Rambøll eftir fundin ger neyðugar rættingar av sáttmálaskjølunum, m.a. broytt nøvn og neyðuga tillaging av tíðarætlan v.m., soleiðis at sáttmálin kann góðkennast í nevndum og býráðnum í juni og síðani undirskrivast ultimo juni.

Kostnaðarmetingin er dagførd, við støði í dagførda tilboðsprísinum hjá Boilerworks. Harumframt eru smærri broytingar í metingini, m.a. at eyka ráðgevaraútreiðslur á 0,1 mió. eru komnar aftrat vegna serligu støðuna, og at metingin av kostnaðinum til burturkastviðgerð í umbyggingartíðini er økt 0,2 mió.
Kostnaðarmetingin fyri alt projektið er nú áljóðandi 30,174 mió., og fíggingartørvurin av íløgum er 28,339 mió. við 6,25 % MVG.

<u>Fyriliggjandi skjøl:</u>

J.nr. 2009-2549/51: Fundarfrágreiðin frá fundi við Danstoker /Boilerworks
J.nr. 2009-2549/52: Danstoker: Hensigtserklæring
J.nr. 2009-2549/53: Útkast til sáttmála (verður væntandi endaliga liðugt 7/6)
J.nr. 2009-2549/54: Dagførd kostnaðarmeting fyri alt projektið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til sáttmála (j.nr. 2009-2549/53), og at heitt verður á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, um at játta kr. 10,0 mió. av markaðum íløgum fyri 2013 og kr. 18,4 mió. av íløgum fyri 2014 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og vísir eisini til samtyktina í teknisku nevnd 6. februar 2013 og beinir málið í býráðið um figgjarnevndina.

Eisini samtykti nevndin at heita á býráðið um at velja bygginevnd til verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Harumframt einmælt samtykt at velja Elina Lindenskov og Boga Andreasen í bygginevndina til verkætlanina.

Helena Dam á Neystabø og Sjúrður Olsen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2009-2549

**131/13** <u>**2000-1326 TíH/MKJ**</u>

<u>**Mál viðv. nýggjum kirkjugarði í Kaldbak**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Áheitan frá Pálli Petersen, býráðslimi, dagfest 1. mai 2000, um at nýggjur kirkjugarður verður gjørdur í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 8. mai 2000:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar-nevndina til ummælis.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2000:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 5. juni 2000:** Umsitingin ger uppskot um økjan av verandi kirkjugarði at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot og kostnaðarmeting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2000:** Samtykt at senda málið til hoyring í kaldbaksnevndini.

**Kaldbaksnevndin 21. september 2000:** Uppskotið til nýggjan kirkjugarð, ið varð framlagt, helt nevndin verða í so umfatandi.

Samtykt at biðja um uppskot til minni víðkan av kirkjugarðinum vestureftir at leggja fyri nevndina aftur.

**Kaldbaksnevndin 22. november 2006:** Nevndin heitir á byggi- og býarskipanar-nevndina um at fyrireika arbeiðið at víðka kirkjugarðin í Kaldbak, tí at einki pláss er eftir.

Sí annars fundarfrásøgn frá borgarafundinum 23. oktober 2006, j. nr. 2005-2969.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at kommunan setur ein arkitekt at tekna eitt uppskot til nýggjan kirkjugarð, har atlit verða tikin til, at kirkjan er friðað og kirkjugarðurin skal fella so væl saman við kirkjuni sum gjørligt.

**Kaldbaksnevndin 13. mai 2008:** Málið hastar, bara nøkur fá pláss eru eftir í verandi kirkjugarði.

Eingin peningur er settur av til arbeiðið. Ynskiligt er, at kommunan tekur upp samskiftið við kirkjuráðið.

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2009:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið og vísti á møguliga staðseting.

- Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Arkitektlesandi og býarskipanardeildin hava saman við lendisdeildini gjørt uppskot til staðseting og skipan av kirkjugarðinum í Kaldbak. Uppskotið fevnir við verandi innrætting um 186 gravpláss.

**Tilmæli.**

Tekniski stjórin og býararkitekturin heitir á nevndina at taka undir við staðsetingini og senda málið til fíggjarnevndina, at útvega neyðugt lendi og fígging til at gera kirkjugarðinum fyri.

**Kaldbaksnevndin 27. januar 2010:** Staðbundnu limirnir ynskja kunning um, hvussu langt málið er komið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at umsitingin gerð eina kostnaðarmeting til komandi fund.

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Tóri í Hoyvík kunnaði um ætlanina við nýggjum kirkjugarði.

**Kaldbaksnevndin 23. februar 2011:** Tóri í Hoyvík kunnaði um ætlanina.

**Kaldbaksnevndin 18. mai 2011:** Kunnað varð um málið. Tilmæli er at keypa størri øki enn bert til kirkjugarðin. Borgarstjórin beinir málið í fíggjarnevndina.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2011:** Borgarstjórin greiddi frá málinum og heitir á løgdeildina at avgreiða málið sum skjótast.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Matrikuleringsviðurskiftini eru avgreidd av Umhvørvisstovuni. Væntandi verða øll formlig viðurskifti avgreidd innan fyri 2-4 vikur, so arbeiðið kann fara í gongd.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Kunnað varð um málið. Borgarstjórin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Staðseting er gjørd hvar kirkjugarðurin skal verða, byggisamtyktin broytt og lendið fingið til vega frá Búnaðargrunninum. Á fundi í Kaldbaksnevndini 29. mai 2012, varð umrøtt at samskipa arbeiðið við kirkjugarðinum við ætlaðu skipan av busssteðgiplássinum og umlegging av Krossgøtu við skúlan í Kaldbak. Mett var, at tað er skilagott um nøgdir av avgrevstartilfari og mold kann endurnýtast á staðnum.
Býarskipanar- og lendisdeildin gera tilfars- og nøgdarmetingar fyri kirkjugarðin og seta seg í samband við teknisku deild um at samskipa arbeiðini á besta hátt.
Peningur at gera projektuppskot er tøkur á projektkonto L65003.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður undir við staðsetingini, at gera projektuppskot og at taka upp samráð við teknisku deild um samskipan av uppgávunum. Prosjektuppskot við kostnaðarmeting at leggja fyri til fíggjarætlan 2013.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 14. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Keyp av lendi til nýggjan kirkjugarð**
Búnaðarstovan bjóðar kommununi at keypa 6.521 ferm. av matr. 22a og 49a í Kaldbak. Keypsprísurin er íalt kr. 798.758,80. Kr. 766.000 eru tøkar á íløguætlanini til kirkjugarð í Kaldbak. Sostatt resta í kr. 33.000.

**Projektering av nýggjum kirkjugarði.**
Projekteringin av nýggjum kirkjugarði er mett at kosta kr. 200.000, og mettur kostnaður 4. mill. at gera nýggjan kirkjugarð.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at kommunan ognar sær lendi til nýggjan kirkjugarð, og at játta kr. 233.000 av framfluttum íløgukarminum 2011 á 6575 kirkjugarðar og at senda málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Kaldbaksnevndin 12. september 2012:** Tekniski stjórin kunnaði um, at avtala við Búnaðarstovuna um lendi til nýggjan kirkjugarð er komin upp á pláss, og at tað sostatt nú er klárt at fara víðari við fyrireikingunum til gerð av nýggjum kirkjugarði.

Borgarstjórin kunnaði um, at tað í løtuni verður arbeitt við íløguætlan fyri 2013, har játtan til kirkjugarðar verður viðgjørd.

**Kaldbaksnevndin 3. desember 2012:** Tekningar lagdar fram. Endaligt uppskot fyriliggur 20. februar at taka støðu til.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja hvussu gongur við arbeiðinum.

**Kaldbaksnevndin 20. februar 2013:** Býargartnarin kunnaði um málið og at arbeitt verður við at gera projektið klárt til útbjóðing. Málið kemur fyri á fyrstkomandi fundi í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot frá 20. februar 2013 og kostnaðarmeting verður lagt fyri nevndina til samtyktar, við umbøn um at loyvt verður at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarviðurskifti:**

Verkætlanin verður mett at kosta 2,5 mió. Settar av til kirkjugarðar í 2013 eru 3. mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at játta kr. 3. mió. av íløgum fyri 2013 fyri kirkjugarðar, §6, kto. 6575, og at beina málið, um fíggjarnevndina, til býráðið. Eisini verður mælt til at bjóða arbeiðið út í undirhondsútboð, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen vóru ikki við til hetta málið

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av kirkjugarði út millum 5 arbeiðstakarar.
Tilboðini verða latin inn tann 07.06.2013 og løgd fyri teknisku nevnd til góðkenningar.

Lisitatiónin var hildin tann 7. juni 2013, kl.13.00.
4 arbeiðstakarar hava latið inn tilboð:

| | |
|---|---|
| S/pf Andrias Berg | 2.213.900,- kr. |
| S/pf Maskinkoyring | 2.000.500,- kr. |
| S/pf við Sjógv | 1.889.435,- kr. |
| Robert Brockie | 2.297.653,- kr. |

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðar uppá 2.972.698,95 kr. íroknað projektering, eftirlit, óvæntað og mvg, sum sostatt liggur innanfyri tann av býráðnum játtaða fíggjarkarmin 21. mars. 2013.
S/pf við Sjógv hevur lægsta tilboð og mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av lægsta tilboðnum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Kaldbaksnevndin 13. juni 2013:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2000-1326.

**132/13** **2013-0141 HH**

**Umsókn um keyp av øki.**

Sp/F Bilrøkt Fastogn, søkir um at kunna keypa uml. 850 $m^2$, burtur av matr. nr. 1070a, Tórshavn, at leggja saman við egnari ogn matr. nr. 1076m, Tórshavn.

Felagið rekur bilverkstað og bilsølu á matr. nr. 1076 m, sum er til víddar 2.299 $m^2$. Samlaða víddin verður hereftir uml. 3.149 $m^2$.

Endamálið við keypinum, er at fáa betri pláss til virksemið.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Viðmerking frá teknisku deild:**
Matrikul 1070a, sum søkt verður um, liggur í umráðisparti B3 og D1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Umleið 320 fermetrar liggja í B3 økinum og restin í D1 øki.

Víst verður til Glyvursvegin, kort j.nr. 2013-0141/5, sum kemur fram við ognini hjá Bilrøkt, víst verður eisini til hæddarmunin millum lidna gongu- og súkklubreyt og verandi lendi á ognini. Um kommunan selur part av matr. 1070a er umráðandi, at kommunan tryggjar sær rætt at seta skráa til møguliga planting, tá vegurin er liðugur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at S/p Bilrøkt Fastogn kann keypa umleið 320 fermetrar, sum liggja innan fyri B3 økið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ein partur av økinum, ið teir brúka at seta bilar á sum nú er, og at bíða at taka støðu til restina av økinum, til vegurin er liðugur út á Argir, treytað av góðkenning frá Innlendismálaráðnum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið við tilmæli um at selja umsøkjaranum lendið fyri 600 kr./m² við góðkenning frá Innlendismálaráðnum.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0141.

**133/13** **2007-1018 BH**

**Umlegging av Sundsvegnum (sí j. nr. 2001-0407)**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við at Landsverk eru farnir undir at gera atkomuveg til Havnar og at ætlanin í næstum er at fara undir vegarbeiðið frá Villingadalsvegnum og suður ímóti økinum 'undir Krákugjógv' er neyðugt, at kommunan tekur støðu í málinum um umleggingina av Sundsvegnum. Víst verður til mál nr. 2005-1533 Brúgv um Hoydalsá og Sundsvegin, har meirilutin í byggi- og byarskipanarnevndini tann 5. november 2005 samtykti, at geva Landsverk loyvi at fara undir brúgvaarbeiðið.

Støða skal verða tikin til, um farast skal undir arbeiðið at projektera og bjóða arbeiðið út at umleggja Sundsvegin – á strekkinum har sum atkomuvegurin til Havnar kemur at liggja.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Arbeiðið at umleggja Sundsvegin fevnir í prinsippinum um at leggja uml. 360 m av nýggjum vegi umframt niðurtøku av verandi vegi. Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið er mettur til uml. 5 mió. kr.
Harumframt er neyðugt at fáa avtalu í lag við eigaran av matr. nr. 1470bx, Tórshavn, um endurgjald fyri mist lendi og møguliga niðurtøku fyri eini úthús/summarhús. Í løtuni fyriliggja ongar metingar fyri hetta arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000 fíggjað av íløgum fyri vegir 2007 til at gera útbjóðingartilfar av arbeiðinum at umleggja Sundsvegin at leggja fyri nevndina aftur. Mælt verður eisini til, at farið verður undir samráðingar við eigaran av matr. nr. 1470bx. Peningur er avsettur á íløguætlan fyri 2007 – álj. 2 mió kr.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen, Marin Katrina Frýdal og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

Ein minniluti Katrin Dahl Jakobsen tekur ikki undir við tilmælinum, tá málið stríðir ímóti samtyktini í býráðnum frá 15. desember 2005 og sum er galdandi til onnur býráðssamtykt fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og játta kr. 500.000,- av íløgum 2007.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og at játta kr. 500.000 til umlegging av Sundsvegnum.

**Ískoyti:**
Semja er nú fingin í lag við ánaran um at Tórshavnar kommuna keypir matr. nr. 1470bx við ástandandi kolonihavahúsi fyri kr. 467.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at heita á býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, um at játta kr. 467.000,-, fíggjað av konto fyri keyp og sølu av lendi, til keyp av matr. nr. 1470bx.

**Tekniska nevnd 3. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og at fíggja kostnaðin av konto 90, íløgur í vegir.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av samtykt hjá teknisku nevnd 16. apríl 2013 í sambandi við framhald av landvegnum suður ímóti økinum 'undir Krákugjógv' (smb. máli nr. 2001-0407 – Landsvegaføring frá Hjalla til Krákugjógv), eigur nevndin at taka støðu til, hvørt verandi Sundsvegur skal umleggjast og tillagast til at fara undir nýggju brúnna á landsvegnum um Hoydalsá samsvarandi prosjektuppskoti frá HMP-consult (sí j. nr. 2007-2409/2).

**Matrikuler viðurskifti.**

Tórshavnar kommuna hevur ognað sær matr.nr. 1470bx, Tórshavn. Harumframt verður neyðugt at útvega uml. 8-900 fermetrar av lendi frá matr. nr 1470a, Tórshavn, eigari: Føroya Jarðargrunnur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyri at fara undir vegagerðina er neyðugt at játta fígging, sum sambært fyribilsmetingum er mett til at verða uml. 7 mió. kr. smb. skjali j. nr. 2007-1018/8.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 0,5 mió. kr. av konto 8175 (Vegir), L81009 (Dagføring av Sundsvegnum, niðari partur) til at gera útbjóðingartilfar og kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2007-1018.

**134/13** **2013-0563 MSH**

**Kloakk við Hoyvík/Hoydalar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá kommununi, er ætlanin at fara undir gera arbeiðið liðugt at samla kloakkirnar í Hoydølum. Talan er um at skipa kloakkleiðing úr Hoyvík, herundir partar í 'Gamla býarpartinum' í Hoyvík og leiða tær út á streymasjógv.

Arbeiðið fer at fevna um at savna kloakkirnar frá Garðavegnum, Gamlaveg og 'Gomlu Hoyvíkini' og leiða kloakkina í verandi útleiðing á Boðanesi.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2.500.000,- og er ynski um at fáa heimild at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftaná. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í vár.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og er ætlanin at nýta 2,5 mió. kr. til dagføring av útleiðingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 2.500.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin 24. mai 2013, kl. 11.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2013-0563/7.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 20136-0563/8, verður samlaði fíggjartørvurin fyri prosjektinum kr. 2.033.959,-. (við 6,25% MVG) Býráðið hevur hin 21. mars 2013 játtað kr. 2.500.000,- til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.033.959,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 (Kloakkir) L68015 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0563.

135/13 **1999-1642**

**Golfvøllurin**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggaræltanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga,

arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstrarætlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur hevur saman við golfvallararkitekti fyrireikað og ment uppskot til konsept fyri golfvølli á Glyvursnesi. Harumframt er gjørt eitt verkætlanaruppskot, herundir designuppskot til golfvøll við 18 holum og driving range v.m. við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íløguna, umframt rakstrarmeting, sí frágreiðing latin býráðnum í juni 2013.

Frágreiðingin gevur somuleiðis eina innleiðslu í golf sum ítrótt og frítíðarítriv, møguleikarnar á Glyvursnesi eins og tey atlit, sum tikin eru í mun samfelagsliga, fíggjarliga og umhvørvisliga burðardygd.

Verkætlanin er tengd at ætlanini um oyggjaleikir í Føroyum í 2019, sum tíðarætlanin tí byggir á, men alt verkætlanaruppskotið røkkur longri og breiðari enn tað og vísir m.a. á teir ágóðar, sum golfvøllurin kann hava fyri ferðavinnuna.

Víst verður somuleiðis á, hvussu golfvøllurin endurskapar lendið, sum í sjónligan mun er ávirkað av grótbrotinum, og hvussu verkætlanirnar við golfvølli og útbyggingin av Tórshavnar havn kunnu samskipast og fáa gagn av hvør aðrari. Grótbrotið ætlast brúkt til venjingarvøll, viðlíkahaldsbygningar og parkering v.m. Neyðugt verður tí at broyta avgerðina um at brúka grótbrotið til tyrvingarpláss og onnur staðseting av tyrvingarplássi finnast.

Til tess at koma víðari, er neyðugt við prinsippgóðkenning av verkætlanaruppskotinum, herundir at fáa gjørt ráðgevaraavtalu við golfvallar-arkitektin, sum lið í klárgering til útboð og arbeiðstøkur. Samstundis verður arbeitt við at fáa neyðugu loyvini til lendið. Harumframt skal setast bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippgóðkenning av konsept- og verkætlanaruppskotinum, at gjørd verður ráðgevaraavtala við golfvallararkitektin, og at sett verður bygginevnd til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fara í samráðingar við landsmyndugleikarnar um tess lut í verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**136/13** **<u>2013-1589</u>**

**<u>Val av bygginevnd til Golfvøllin</u>**

**Býráðið 26. juni 2013:** Eftir uppskoti frá borgarstjóranum eimælt samtykt at velja Helenu Dam á Neystabø og Jógvan Arge í bygginevndina.

**137/13** **<u>2012-0851 AMDO</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til nýggjan skrivstovubygning við Tinghúsvegin/ Bøkjarabrekku, matr. nr. 419, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá EM Ráðgeving ið søkir vegna Havnar Arbeiðsmannafelag, dagfest 21.05.2012, um byggiloyvi til nýggjan skrivstovubygning við Tinghúsvegin/Bøkjarabrekku, à matr. nr. 419.

Sum útgangsstøði er hetta prosjektið eitt víðari arbeiði út frá tí prosjekttilfari sum lá til grund fyri útbjóðingartilfarinum frá mai 2011 – J.nr. 2010-1335.
Nakrar broytingar verða gjørdar í mun til útbjóðingartilfarið, eftir ynski frá byggiharra, meðan nakrar av broytingunum verða gjørdar við atliti til byggihátt og brunaviðurskifti v.m.

<u>Generellu broytingarnar verða sum niðanfyri lýst í punktum:</u>
a) Berandi bygningslutir, sum vóru úr stáli verða broyttir til betongkonstruktiónir.
b) Betongdekkið í Ebenezer-garðinum verður tikið burtur, men verða svalarnir á vestursíðuni verandi.
c) Mekanisk ventilatión verður eisini gjørd í hornabygninginum, saman við ventilatiónini í nýggja bygninginum.
d) Ætlanin er, at elevatorskaktin skal brúkast sum føringsvegur til ventilatiónina.
e) Vesini á 3, 4 og 5 hædd, verða broytt soleiðis, at eitt av tveimum vesum lúka krøvini til vesir til rørslutarnað.

f) Verandi rýmingarleiðir í hornabygninginum, t.v.s. svalar og trappur v.m., verða ikki broytt ella bygd saman við rýmingarleiðum í nýggja bygninginum.
g) Trapputornið uttanfyri bygningin, verður flutt longur yvir móti Bøkjarabrekku, og snarað 90 gr.
h) Fundarhølið verður flutt yvir á nýggja bygningin.
i) Ventilatiónshús verður gjørt uppi á tekjuni, at húsa anlegginum til báðar bygningarnar.

Aðrar broytingar:

1. hædd, kjallarin
Kjallaraútveggurin móti Tinghúsvegnum, verður fluttur 2,5 m út, so at hesin hevur somu flukt sum útveggurin omanfyri.
Eisini verður kjallaraveggurin móti Bøkjarabrekku snaraður 90 gr. í mun til veggin móti Tinghúsvegnum.

2. hædd, í hornabygninginum (verandi bygningur)
Í hornabygninginum, har móttøkan er í dag, verða broytingar gjørdar, sí frágreiðing niðanfyri.

2. hædd, nýbygningur.
Felagsinngongdin hjá HAF og útleigarum verður endurskoðað, við atliti til at skapa betri pláss til vesir á 2 hædd.

5. hædd, hornabygningur (verandi bygningur)
Innrættingin av 5. hædd í hornabygninginum, verður broytt aftur til verandi innrætting. T.v.s. eingin broyting.

5. hædd, nýbygningur.
Fundarhølið verður hongt upp á trappuskaktina á vestursíðuni, og verður í hesum sambandi, onkur broyting gjørd av innrættingini á 5. hædd.

Verkætlanin umfatar, at taka verandi bygning á Tinghúsvegi nr. 7 og nr. 9 niður, og síðani at byggja nýggjan skrivstovubygning á sama stað í 5 hæddum (við kjallara hæddini). Nýggi bygningurin skal byggjast saman við verandi bygningi á Tinghúsvegi nr. 5 (hornabygninginum).

Verandi hornabygningur verður ikki nervaður av verkætlanini, við undantaki av 2. hædd (veghæddini). Í sambandi við byggingina av nýggja skrivstovubygninginum, verður 2. hædd í verandi hornabygningi broytt soleiðis at:

- báðir bygningarnir fáa somu inngongd.
- móttøkan, ein skrivstova og te-køkurin hjá Landsverk verður flutt, til annað stað á somu hædd.
- 3. nýggjar skrivstovur og ein nýggjur te-køkur verða gjørd ístaðin.
- verandi elevator (allar hæddir) verður avmonteraður, og elevatorskaktin verður nýtt til føringsveg.

Nýggi bygningurin:

Nýggi bygningurin verður bygdur í 5. hæddum (við kjallarahæddini), á 258 m² gólvvídd hvør.

Nýggi bygningurin verður bygdur eftir reglum samsvarandi danska BR08 og eftir KBB-99.

Útveggirnir á 1. hædd (kjallarahæddini) verða stoyptir á staðnum, bjálvaðir og á framsíðu lagdir við pussi. Eisini er útveggurin móti Tinghúsvegnum á 2. hædd, stoyptur á staðnum, somuleiðis er eisini útveggurin móti Bøkjarabrekku staðstoyptur í fulla hædd. Hesir útveggir verða eisini bjálvaðir uttan, og lagdir við pussi. Framsíðurnar móti Tinghúsvegnum og inn móti Ebenezergarðinum annars, verða úr glas/alu fasadum.

Sí nærri konstruktiónslýsingar á tvørskurðum.
Berandi og stabiliserandi konstruktiónir verða í høvuðsheitum gjørdar úr betong, t.v.s. staðstoyptir betongveggir, pre. fab. betong súlur, betongbjálkar og betongholdekk. Sí nærri lýsing hesum viðv. í hjálagdu frágreiðing frá HMP verkfr.

Í sambandi við byggingina, verður m.a. gjørt nýtt felags reinsianlegg fyri Tinghúsveg nr. 5, nr. 7 og nr. 9. Eisini verður nýggjur oljutangi lagdur niður.

Sí nærri lýsing viðv. HVS og ventilatión í hjálagdu frágreiðing frá PB Consult verkfr..

Tað verður eisini gjørd mekanisk ventilatión til báðar bygningarnar. Í sambandi við hetta arbeiðið, verður nýtt ventilatiónsanlegg sett á takið á nýggja bygninginum.

Í sambandi við parkeringsviðurskifti, er byggiharri farin í samráð við Ebenezer, um at skipa felags parkeringsviðurskifti í Ebenezergarðinum.

Nýtslustigið: Vídd á matr. nr. 419 er 866 m² Mest loyvda nýtslustig er 3,0 samb. §4 stk. 2.

Verandi bygningur uttan kjallara er 4 x 277 m² = 1.108 m²
Nýggi bygningurin uttan kjallara er 4 x 258 m² = 1.032 m²
Samlað nýtslustig: 1.108+ 1.032 / 866 = 2,47

**Byggipláss og skipan av ferðslu:**
Byggiplássið verður innrætta í Ebenezergarðinum (EBZ), við arbeiðs- og vesiskúrum, ruskbyngjum og tilfarsgoymslu v.m., umframt einum stationerum byggiplásskrana. Størri bygningskompunentar so sum betong elementir og súlur/bjálkar, vera ikki goymd á byggiplássinum, men koma á staði í samband við montering. Atkoman til byggiplássið verður frá Bøkjarabrekku, har verandi innkoyring til parkeringsplássið hjá EBZ, er í dag.

Byggiplássið verður í byggitíðini skilt frá alfaravegi, við arbeiðshegni og ella plátum, og vera skelti sett upp sum lýsa byggiplássið.

Í byggitíðini vanta vit, at vestara koyribreytin á Tinghúsvegnum verður stongd fyri ferðslu. Tó so, at tá útv. arbeiðið er liðugt, vanta vit ikki, at tað verður neyðugt at hava koyribreytina stongda longur. Vit ætla, at vestara koyribreytin á Tinghúsvegnum verður stongd fyri ferðslu, tá arbeiðið at taka verandi bygningi niður byrjar. Í samband við niðurtøkuna, verður eisini neyðugt, at steingja sunnaru gongubreytina, fram við bygninginum móti Bøkjarabrekku av, og vísa fótgangarum til norðaru gongubreytina.

Arbeiðið at taka verandi bygning niður, er í høvuðsheitum ætla, at vera gjørt frá EBZ. hettar fyri at nerva ferðslu og grannar sum minst. Tó so, at tað kann roknast við, at neyðugt verður, at gera okkurt arbeiðið frá t.d. Tinghúsvegnum.

Graviarbeiðið sum skal gerast móti Tinghúsvegnum og Bøkjarabrekku, verður gjørt í størstan mun frá EBZ. Móti Bøkjarabrekku verður bert grivið í gongubreytina, men verður neyðugt, at seta arbeiðsgirðingar upp uttast á sunnaru koyribreytinu, tó uttan at steingja Bøkjarabrekku. Móti Tinghúsvegnum, verður møguliga neyðugt at grava nakað inn í vestaru koyribreytina. Hetta grunda á leiðingar hjá Føroya Tele.

So hvørt bygningurin kemur upp um veghædd, vera arbeiðsstillasir sett um bygningin. Stillasið móti Bøkjarabrekku, verður gjørt soleiðis, at fótgangarar kunnu ganga undir stillasinum. Tó so, tá tungir bygningskompunentar so sum betongelementir v.m. verða monteraði, verður neyðugt at steingja gongubreytina av.

Sum nevnt omanfyri, vera betongelementir ikki goymd inni á byggiplassinum. Arbeiðstakari fer at hava ábyrgd fyri, at leggja so til rættis, at t.d. betongelementir vera goymd aðrastaðnis, á økið hjá arbeiðstakara ella aðrastaðnis. Í samband við montagu av betongelementum, verður tørvur á størri mobilum krana, at lyfta betongelementini á pláss. Í hesum sambandi verður neyðugt at steingja Tinghúsvegin av fyri ferðslu, akførum og fótgangarum. Betongelementini vera tá koyrd til byggiplássið, til Tinghúsvegin, á vognum, og lyft upp á pláss av vogninum. T.v.s., at tá elementir vera monteraði, verður neyðugt at steingja Tinghúsvegin í um 1 dag í senn.

Tá ráðbygningur er reistur, alu- fasadur eru monteraðar og endin móti Bøkjarabrekku liðugt klæddur, verður ikki tørvur á stillasum, móti Bøkjarabrekku og Tinghúsvegnum, longur. Heldur ikki verður tørvur á vestaru koyribreytini av Tinghúsvegnum í samband við arbeiðið.

Eftir at bygningurin er liðugur uttan, verður arbeiðið skipa frá EBZ.

**Atkoma:**
Atkoman til bygningin útifrá, verður møgulig í tveimum støðum. Høvðusatkoman verður frá Tinghúsvegnum, meðan atkoma gjøgnum bakdyr verður frá parkeringsplássinum í EBZ. Báðar atkomur verða gjørdar, við atlitið til brúkarar við rørslitarni.

Sí tekning nr. 8.00, Innrættan av byggiplássi, dagf. 04.06.2012

**<u>Í hesum sambandi verður søkt um at byggja við frávik.</u>**

Søkt verður um undantaksloyvi at byggja eitt ventilatiónshús uppi á tekjuni, omaná 5. hædd. Ein partur, 1,5m – 2m, av ventilatiónshúsinum fer uppum horisontalu byggilinjuna ið er umleið 14 m, javnfjarð við lendið móti Tinghúsvegnum, ið er tað mest loyvda.

Í ásetingunum í serstøku byggisamtyktini fyri økið kann undantaksloyvi verða givið sambært, *§ 4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA,*
*Stk. 3.* Hús mugu ikki verða bygd hægri enn ásett er í fylgiskjali 1, fyri hvørt
einstakt byggifelt. Hægst loyvda byggihædd er ásett við kotum eftir
markalinjuni, ið avmarkar økið ið byggisamtyktin fevnir um. Eingin partur av húsinum, yvirgrind ella møn o.s.f.v mugu koma upp um stiplaðu linjuna.
Undantaksloyvi kann tó verða givið fyri elevatorhúsum, ventilatiónshúsum ella øðrum lágum, løttum og smærri bygningum, ið fella natúrligt inn í skapi á húsinum og sum byggimynduleikin metir ikki sjónligt økir um húsahæddina.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í serstøku byggisamtyktini fyri økið innanfyri Bøkjarabrekku, Tinghúsveg, Sverrisgøtu og Niels Finsens gøtu í 1. grundumráði í almennu samtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Á matr. nr. 419 (fyrrverandi matr. nr. 414e, 414b) er ábygt skrivstovubygningur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, ið skal takast niður, og nýggjur byggjast ístaðin.
Á matr. nr 419 er ábygt skrivstovubygningur hjá Landsverk
Byggistig: Ongin áseting er í serstøku byggisamtyktini um byggistig, men loyvt er at byggja út í mark.
Nettonýtslustigið verður 2,47. Mest loyvda er 3,0.
Hædd til mønu á ventilatiónshúsinum verður umleið 15.5 m – 16 m. Mest loyvda er umleið 14 m.

Umsóknin um frávik er send til grannahoyring og freistin hjá grannunum at svara er sett til 8. juni 2012.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn til frávik, j.nr. 2012-0851/7
Chekklisti, j.nr. 2012-0851/11
Fráviksskjal, j.nr. 2012-0851/12
Støðumyndir, bentley.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at umsóknin verður gingin á møti vísandi til omanfyri nevndu frágreiðing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Byggipláss og tíðarskeið fyri skipan av ferðslu.**
Prosjektið er eitt víðari arbeiði út frá tí prosjekttilfari sum lá til grund fyri útbjóðingartilfarinum frá mai 2011 – j. nr. 2010-1335. (sí: lýsing av málinum – samandráttur**).**

Í omanfyri nevnda útbjóðingartilfarinum frá mai 2011 var ætlanin at arbeiða frá garðinum frammanfyri Losjuni. Í nýggju umsóknini verður arbeiðið gjørt frá garðinum hjá Ebenezer, og tí eru fortreytirnar broyttar.

Býráðið tók 14.04.2011 avgerð um at nokta fyri at sperra Tinghúsvegin, men at seta umsøkjarunum sum treyt, at tunnil/brúgv verður at seta upp og at koyribreyt og gongubreyt verða gjørd, ovast á vegnum, á eystaru síðu á Tinghúsvegnum.

Hesaferð verður søkt um loyvi til partvís at sperra Tinghúsvegin, t.v.s. at sperra ovasta partin av Tinghúsvegnum gerandisdagar (uttan fríggjadag) eftir kl. 18 til midnátt ella so leingi sum montasjuarbeiðið varar. Loyvi skal fevna um tíðarskeiðið februar til juli (eina viku áðrenn ólavsøku 2013). Hetta treytað av góðkenning frá býráðnum.

**Tilmæli:**
Vísandi til avgerð býráðsins í j.nr. 2010-1335, og broyttu fortreytirnar sambært omanfyri standandi lýsing, mæla tekniski stjórin og leiðarin fyri byggideildina til at beina málið í býráðið um teknisku nevnd, til støðutakan til umsóknina um tíðaravmarkaða steinging av Tinghúsvegnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Vísandi til avgerð býráðsins í j.nr. 2010-1335, og broyttu fortreytirnar sambært omanfyri standandi lýsing, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at loyva umsøkjaranum at sperra ovasta part av Tinghúsvegnum mánadag til hósdag millum kl. 18.00 og 24.00 í tíðarskeiðnum febr. til hálvan juli 2013, og at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta málið.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsøkjarin hevur sent kommununi uppskot um nýggja tíðarætlan vísandi til at farið ikki var undir arbeiðið sum upprunaliga ætlað. Nú er ætlanin at fara undir arbeiðið um hálvan juni 2013. Í dagførdu tíðarætlanini verður lagt upp til at ovari partur av Tinghúsvegnum verður sperraður frá 15. juni 2013 til 20. juli 2013. Hetta meðan farið verður undir at rigga til fyri niðurtøkuni av verandi bygningi. Um ólavsøkuna skal verða friður og eftirfylgjandi verður Tinghúsvegurin so aftur sperraður frá 5. august 2013 til 1. november 2013.

Eftir hetta verður lagt upp til at eystara síða av Tinghúsvegnum verður latin upp aftur fyri almennari ferðslu, meðan vestara síða verður sperrað í tíðarskeiðinum frá 1. november 2013 til 30. september 2014. Frá oktober 2014 er sostatt allur ovari partur av Tinghúsvegnum opin fyri almennari ferðslu.

**Ferðslunevndin 24. mai 2013:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at ganga umsóknini á møti.

**Býráðið 26. juni 2013:** Borgarstjórin legði fram broytingaruppskot um, at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd, tó so at Tinghúsvegur ikki verður stongdur fyrrenn 5. august 2013.

Broytingaruppskot frá borgarstjóranum samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal, Bogi Andreasen, Jógvan Arge og Jógvan Dam.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-0851.

**138/13** **<u>1999-0345 BYGM</u>**

**<u>Høllin á Hálsi - nýtt gólv</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða “høllin” í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í “føroyskum kr” 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |

| | | |
|---|---|---|
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. | 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

<u>at</u> peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**

Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
|---|---|
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |

| | |
|---|---|
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:

Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |

Metingin hjá HMP-Consult 6.725.000,00 kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til

at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið uppá útskifting av gólvplátum og álegging av nýggjum sportslinoleum er boðið út sum undirhondsboð av HMP- Consult, ið eru ráðgevar í málinum. Tilboðini vóru hesi, uttan mvg:

Skifta gólvplátur v.m.

- Træsmiðjan Sp/f 598.210,- kr.
- Articon P/f 537.480,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 520.000 kr.

Nýtt sportlinoleum v.m.

- Gólvbúni Sp/f. 414.750,- kr.
- Eyðfinn K. Eyðunsson Fa. 388.500,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 424.000,- kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini og mæla til at skriva arbeiðstøkusáttmála við ávikavist Articon og Eyðfinn K. Eyðunsson, sum áttu lægstu tilboðini.

Eftir samráðingar við Articon um nakrar broytingar, er semja um sáttmálaupphæddina kr. 437,000,-.

Viðv. samlaða fíggjartørvinum verður víst til j. nr. 2012-1785.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðunum við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, frá ávikavist Articon á kr. 437.000 og Eyðfinn K. Eyðunsson á kr. 388.500, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmálar við hesar.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðunum frá Articon við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, og at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við Eyðfinn K. Eyðunsson og Gólvbúna Sp/f og gera sáttmála um eitt gólv/sportslinoleum av sama slag sum verandi gólv.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi hevur stóran umvælingartørv. Í fjør varð gólvið skift (konta 5775, L 57003 Høllin á Hálsi). Sum tað framgongur av málslýsingini omanfyri, er bráðneyðugur tørvur á at skifta takið í høllini. Víst verður eisini á, at ein heildarumvæling av høllini er neyðug, tað er at skifta takið, nýggja ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan.

Við støði í kostnaðarmeting frá september 2011 varð mett, at til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014. Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió, sum í høvuðsheitum røkkur til at fáa skift takið og orkusparandi ventilatiónsskipan. Harumframt er eitt avlop á kontu L57003 uppá umleið 1 mió, sum kann verða flutt til tey arbeiði, sum gerast skulu í summar.

Sum fyrireikingar av arbeiðinum skal útbjóðingartilfar gerast. Mælt verður til at bjóða byggiarbeiðið út sum innboðin lisitatión. Ætlandi skal arbeiðið fremjast í summar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión. Harumframt verður mælt til at játta kr. 10 mió av íløgukontu 5775 fyri 2013 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta 10 mió. kr. av íløgukonto 5775 fyri 2013 til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**<u>Ráðgevarasáttmálar Ráðgevarasáttmálar</u>**

**31-05-2013** Hevur HMP undirskriva ráðgevarasáttmála fyri bygnings- og EL arbeiðir.

**04-06-2013** hevur pb Consult undirskriva ráðgevara sáttmála fyri ventilatiónsprosjekt.

**21-06-2013** hevur verið licitatión fyri bygnings- og EL arbeiðir.

Innkomin tilboð:

| Felag: | Upphædd | Fyrivarni: |
|---|---|---|
| Articon: | Kr. 13.875.468,00 | ABF 06 |
| TG Verk | Kr. 12.873.516,98 | Tíðarætlan (Sí Skriv) |
| Búsetur | Kr. 8.635.052,01 | ABF 06 |
| Húsavarðatænastan | Kr. 9.624.351,00 | ABF 06 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Búsetur á kr 8.635.052,01.

**Mentamálanevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**139/13** **2013-1599**

**Tórshavnar ungdómsráð**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Leingi hevur verið tosað um týdningin av at seta á stovn eitt ungdómsráð í Tórshavnar kommunu.

Eitt ungdómsráð er umboð teirra ungu í kommununi. Endamálið er at styrkja demokratiið í kommununi, við at skapa eitt forum, har ung, sum í dag ikki hava valrætt til býráðið ella løgtingið, fáa eina rødd í politisku skipanini.

Arbeitt verður við einum uppskoti til viðtøkur fyri Tórshavnar ungdómsráð.

**Tilmæli:**

Borgarstjórin mælir til í prinsippinum at taka undir við uppskotinum at skipa Tórshavnar ungdómsráð og beina málið í mentamálanevndina.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt og beint í mentamálanevndina.

**140/13** **2011-0679**

**Uppskot til skúlabygnað**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli. Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har

kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Kunnað varð um niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021

**Ískoyti:**
Við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum umboðandi skúlastýrini, hevur annar arbeiðsbólkur nú útgreinað eitt konsept fyri nýggjum Vesturskúla (sí máltal 2012-1064). Arbeiðið er fyrsta stigið í fyrireikingunum at byggja henda skúlabygning.

Í nevndu ætlan er Vesturskúlin ein trý-sporaður skúli við forskúla og frítíðarskúla, og sostatt í samsvari við bygnaðin og skúlatilboðini, sum skotin verða upp í álitinum. Trý-sporaði Vesturskúlin er saman við ætlanini at flyta Nám X úr Eysturskúlanum høvuðsfortreyt fyri, at til ber at skipa skúlabygnaðinum fyri alla kommununa eftir uppskotinum í álitinum.

Vísandi til ætlanina at byggja Vesturskúlan (máltal 2012-1064) verður mett neyðugt við politiskari støðutakan til høvuðslinjurnar í uppskotinum til nýggja skúlabygnað fyri alla kommununa.

Hesar høvuðslinjur eru:
- At talið av sporum í høvuðsstaðarskúlunum í hádeild (7.-9. flokk) verður 14
- At Venjingarskúlin og Kommunuskúlin leggja saman í trý-sporaðan Vesturskúla
- At Skúlin á Argjahamri, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt verða tvey-sporaðir skúlar 1.-9. flokk
- At Eysturskúlin verður tvey-sporaður 1.-6. flokk og fimm-sporaður 7.-9. flokk
- At Sankta Frans skúli verður tvey-sporaður 1.-6. flokk
- At næmingar úr Sankta Frans skúla, Nólsoyar skúla, Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Kollafjarðar skúla flyta í 7. flokk í Eysturskúlan
- At Nám X flytur úr Eysturskúlanum

Uppskotið um at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum hongur ikki saman við skúlabygnaðinum, men er mál um skipan av skúlatilboðum.

Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til skúlabygnað fyri alla kommununa samsvarandi høvuðslinjunum omanfyri.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið og til kunningar í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Kunnað varð um málið

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagf. 19. februar 2013 boðar Mentamálaráðið frá, at Mentamálaráðið góðkennir ikki uppskotið til nýggjan skúlabygnað fyri Tórshavnar kommunu.

Í skrivinum verður víst á, at Mentamálaráðið arbeiðir við broytingum í fólkaskúlabygnaðinum, so at tímar í størri mun verða tillutaði til skúlaøki. Á henda hátt metir Mentamálaráðið, at tað ber til at tillaga fólkaskúlabygnaðin til tey ávísu økini, sum síðan sjálv gera av, í hvørjum hølum undirvíst verður.

Mentamálaráðið hevur ætlanir um at seta eina royndarskipan í verk, har tímatillutanin verður lagað eftir næmingatalinum í hvørjum árgangi. Ætlanin er framhaldandi, at kommunurnar sjálvar skulu gera av, hvørjir skúlabygningar skulu brúkast, men hetta má vera í tráð við fíggjarviðurskifti landsins, og í tráð við hvussu nógvir næmingar eru. Mentamálaráðið vil fegið samstarva við Tórshavnar kommunu viðvíkjandi skúlabygnaðinum í framtíðini og er altíð til reiðar at umrøða spurningin nærri.

Meðan omanfyri nevnda serliga snýr seg um tímajáttanina frá Mentamálaráðnum til skúlarnar, er skúlabygnaðurin eisini tengdur at íløguætlanini hjá kommununi í mun til tørv á skúlabygging og dagføring. Fundir hava verið við skúlastýri serliga í mun til støðuna hjá
Venjingarskúlanum, Tórshavnar kommunuskúla og Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at fáa til vega eina verkætlanar- og tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla og heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 1.000.000 av kontu 4176 verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Tróndur Sigurðsson, taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av konto 4176, verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking, at fáa til vega eina tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla. Umsitingin fær til vega tørvslýsingina í samráð við mentamálanevndina, ið verður at leggja fyri býráðið í seinasta lagi 15. september 2013.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 26. juni 2013.

**141/13** **<u>2013-1179 HN</u>**

**<u>Áheitan frá Magnus Ísak Poulsen, um at kommunan yvirtekur vegin Fjalstún, matr. nr. 1106n, 1106k og 1106g, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fjalstún er ein 6 m breiður útstykkingarvegur uttan gongubreytir. Útstykkingarloyvið er frá 18. mars 1991 (mál 15/1. 1987). Vegurin er asfalteraður og er annars í góðum standi við gøtuljósum og vegristum. Ein 1,5 x 21 m geiri er lagdur av til gøtu millum Fjalstún og Gráasteinsgøtu. Gøtan er ikki gjørd. Einki er nevnt í útstykkingarmálinum um hvør skal gera gøtuna.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at vegurin verður yvirtikin, og at kommunan einki ger við gøtuna fyribils.

**Tekniska nevnd 25. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 25. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-1179

**142/13** **2006-1323 (sí eisini mál nr. 2005-1996 og 2009-1732) EYE**

**Høgni Jacobsen: Viðvíkjandi endurgjaldi í sambandi við ognartøku av vegi við Dvørgastíg í Tórshavn.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Málið um ognartøkuna av parti av Dvørgastígi var avgreitt, tá Hægstirættur staðfesti ognartøkuna í 2006. Høgni Jacobsen hevur í sambandi við staðfestingina, í skrivi dagf. 31.mars 2006 til kommununa, gjørt vart við endurgjaldskrav.

Hetta málið um endurgjald hevur sín uppruna í øðrum málum um Dvørgastíg og eru tey hesi:

- Mál nr. 2005-1996
  Viðv. ferðsluviðurskiftunum í Dvørgastígi - parkeringsviðurskifti ísv virki í gøtuni (matr. nr. 789x)
- Mál nr. 2004-1700
  Bjarki Jacobsen vegna Ottar Jacobsen : Viðv. vatn sum rennur frá Dvørgastígi inn í urtagarðin hjá Ottari Jacobsen. Heitir á kommununa um at gera nakað við málið.
- Mál nr. 2004-1005
  Alment innlit í málið matr. 789x viðvíkjandi ognartøku Dvørgastígur - umsókn frá Advokatvirkinum og skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni viðv. klagu frá Oddvør Jacobsen
- 2001-2328
  Advokatar Poul Hansen og Jónfinn Thomsen: Viðv. ognartøku av Dvørgastígi
- 1999-1153
  Dvørgastígur yvir í Vættrastígur nýggj kloak
- 1999-0998
  Ottar Jacobsen: Viðvíkjandi ferðsluviðurskiftunum í Dvørgastígi

Í skrivinum, dagf. 31. mars 2006, verður m.a. kravt, at ognartikna lendið verður endurrindað við at kommunan letur annað lendi, eitt nú grundstykki. Í tí sambandinum verður víst til § 20 í býarskipanarlógini. Í øðrum lagi verður kravt endurgjald fyri handilsvirðið á ognini, og at hetta verður sett samsvarandi virðinum á byggilendi.

Víst verður á, at nú kommunan hevur ognartikið part av Dvørgastígi, sum gongur fram við matr. nr. 789n, og 789m, verður eisini kravt, at kommunan yvirtekur restina av vegnum. Í tí sambandinum verður víst til § 14, stk 1, í býarskipanarlógini.

Harumframt verður sett fram krav um, at kommunan rindar endurgjald fyri mist handilsvirði av ognini umframt endurgjald vegna virðisminking av resterandi ogn og endurgjald vegna ampar. At enda verður kravt, at ognartikni vegurin verður settur í stand og at kommunan letur gera hegn og garð fram við vegnum. Í skrivinum verður eisini biðið um fund við kommununa um at fáa avgreitt nevndu spurningar.

Nógv samskifti hevur verið millum Høgna Jacobsen og umsitingina, at fáa greiðu á hvussu ein virðilig loysn kann verða funnin á endurgjaldsspurninginum.

Umsitingin hevur í tí sambandi latið gera ein handlingsplan, ið tekur støði í at ovari partur av Dvørgastígi verður knýttur í Heiðavegin, meðan niðari partur verður knýttur í Varðagøtu. Hetta vil føra við sær, at niðari partur av Dvørgastígi einans skal verða nýttur av matr. nr. 789c, nr. 789e , nr. 789f Tórshavn, meðan restin – tann ovari parturin verður knýttur at eini framtíðar atkomu frá Heiðavegnum, tvørtur um matr. nr. 789n, ið er ogn hjá kommununi. Men av tí at henda ogn í løtuni verður nýtt sum fríøki, er ynskiligt, um tann parturin av Dvørgastígi, ið upprunaliga var ætlaður til veg at binda í Heiðaveg, verður latin kommununi at leggja saman við fríøkinum ella at nýta sum fríøki, soleiðis at fríøki verður báðu megin íbindingina í Heiðaveg. Tað vil siga, at ímillum Dvørgastíg nr. 5 og 7 verður sperra at seta upp soleiðis, at tað ikki verður koyrandi millum ovara og niðara part á Dvørgastígi. Afturfyri verður skotið upp, at kærarin fráfellur nevndu krøv í skrivi til kommununa.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Kommunan kemur undir øllum umstøðum at rinda eitt ávíst gjald fyri ognartøkuna av niðara parti av Dvørgastígi. Eftir sum partarnir ikki kunnu koma ásamt um virðið á ognartikna lendinum, eru ikki aðrir møguleikar enn at velja ein metingarmann.

Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av teimum krøvum, ið Høgni Jacobsen hevur gjørt vart við. Heldur ikki er nøkur meting gjørd fyri kostnað av arbeiðinum at gera neyðugar ábøtur á Dvørgastíg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður við at gera semju við Høgna Jacobsen, um at hann letur kommununi restina av Dvørgastígi afturfyri at kommunan fer undir omanfyri nevndu arbeiði, treytað av at kærarin fráfellur nevndu krøv.

Mælt verður eisini til at játta kr. 150.000 av reguleringskontoini at gera eitt skitsuuppskot við kostnaðarmeting av:

- nýggjum atkomuvegi millum Dvørgastíg og Heiðaveg
- fríøki við Heiðavegin
- gera ábøtur á niðara part av Dvørgastígi.

Peningur er ikki avsettur á íløguætlan fyri 2007.

**Tekniska nevndin 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at fáa gjørt meting av endurgjaldsspurninginum fyri tann partin av Dvørgastígi, ið er ognartikin.

- Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Nevndin samtykti at senda málið um møguliga vegaatkomu millum Heiðaveg og Varðagøtu til hoyringar í grannalagnum.

- Umsitingi hevur móttikið skriv frá borgarum í grannalagnum, sum vóru send nevndarlimunum undan fundinum.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um málið.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Leivur Hansen, samtykti at eingin atkomuvegur verður gjørdur millum Heiðaveg og Dvørgastíg.
Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at gera eitt skitsuppskot, sum tekur støði í at steingja Dvørgastíg frá Varðagøtu og at binda Dvørgastíg í Heiðaveg.
Ein samd nevnd samtykti at seta metingarnevnd at avgreiða endurgjalds-spurningin.

**Ískoyti:**
Eigarin av ovara parti av Dvørgastígi hevur lagt moldrúgvu uppi við endan av vegnum og hevur hetta ført við sær truplari atkomuviðurskifti hjá grannalagnum. Av terirri grund hevur formaðurin í nevndini ynskt at viðgjørt málið enn eina ferð. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 3. apríl 2008:** Kunnað varð um málið.

- Spurningurin viðv. moldrúgvuni er ikki loystur enn eins og tilgongdin av málinum um endurgjaldsspurningin er drigin eitt sindur út. Umsitingin kemur, saman við Julionnu Klett, sakførara, at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Julianna Klett greiddi frá gongdini í málinum.

- Umsitingin kemur saman við løgfrøðingi at kunna um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Julianna Klett greiddi frá gongdini í málinum.
- Umsitingin kemur saman við Julionnu Klett, sakførara, at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað var um málið. Víst verður til j. nr. 2006-1323/61.

- Borgarstjórin ynskir at umrøða málið við nevndina.

**Tekniska nevnd 24. september 2009:** Málið umrøtt.

- Borgarstjórin ynskir at umrøða málið við nevndina.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Tikið av skrá.

- Skriv er komið frá Advokatskrivstovuni, dagf. 22. august 2011, við áheitan um fund viðvíkjandi umvæling av Dvørgastígi. Spurt verður um hvørjar ætlanir kommunan hevur viðvíkjandi dagføringini av vegnum, sum nú er yvirtikin. Kunnað verður annars um

gongdina í málinum frá tí at málið um endurgjald av vegnum var kært til Landsrættin og eftirfylgjandi at býráðið avgjørdi at taka kæruna aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til tilmæli 10. mai 2007, ella at nevndin tekur støðu til dagføringina av Dvørgastígi, herundir umfangið av eini slíkari dagføring. Somuleiðis verður mælt til, at játtan verður raðfest á komandi íløguætlanum til at gera arbeiðið, uttan mun til hvørja loysn avgjørt verður at fremja.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Borgarar hava gjørt vart við, at tað ríðir undan vegnum á vegamótinum oman fyri hjá Ottari Jacobsen, sála, og vísa á, at tørvur er á at dagføra vegin. Játtanin fyri árið 2012 til Dvørgastíg/undir Borgarhálsi álj. kr. 2 mió. er sett av til Borgarháls. Neyðugt er tí at útvega fígging til arbeiðið at dagføra Dvørgastíg.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.

Nevndin samtykti, at umsitingin letur gera eitt skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin ætlar at heita á ráðgeva um at útvega skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 250.000,- av íløgujáttanum til vegir 2013, kto. 8175, til at útvega skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at útvega skitsuprojekt við kostnaðarmeting av, hvussu niðari partur av Dvørgastígi við ábótum kann gerast trygg farleið við nýggjari atkomu frá Heiðavegi. Eisini samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 250.000 av íløgujáttanum til vegir 2013, kto. 8175 til endamálið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 21. februar 2013:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge og Jákup Dam.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Hóast niðari partur av Dvørgastígi er somikið brattur og smalur, at stór og tung akfør ikki sleppa um niðasta trongan, so vísir tað seg at tilfarið undir verandi asfalti er somikið vánaligt, at hóast lítlu og løttu ferðsluna, so ferst asfaltið og undirlagið skjótt og krevur tí javnan eftirbøtingar.

Eisini er garðurin, sum stuðlar uppundir niðara part av vegnum, farin at smokka undan og eru gøtuljós og avvatning av vegnum er heldur ikki nøktandi.

Dvørgastígur er vegtekniskt í somikið ringum standi, at ábøturnar/dagføringin av vegnum kemur, fyri at henda skal verða nøktandi, at svara til nýgerð av vegi við øllum tilhoyrandi tekniskum installatiónum so sum kloakkum og gøtuljósum v.m.

Umsitingin hevur útvegað skitsuuppskot við kostnaðarmeting frá ráðgeva, sambært samtykt í býráðnum 21. febr. 2013.

Kostnaðarmetingin er í tveimum pørtum:
1) Dagføring av niðara parti (brekkan) av Dvørgastígi (sí j. nr. 2013-0570/6).
2) Dagføring av øllum Dvørgastígi (sí j. nr. 2013-0570/3).

Ad1.
Út frá fyriliggjandi skitsuuppskoti verður mett, at samlaðu útreiðslurnar at dagføra niðara part (brekkuna) av verandi Dvørgastígi verða uml. kr. 1.481.00,- íroknað MVG (sí j. nr. 2013-0570/5). Arbeiðið fevnir bert um niðara part av vegnum og er sostatt einginupphædd sett av til dagføring av ovara parti, tvs frá Dvørgastígi nr. 3 til 9.
Áður eru við býráðssamtykt tann 23. februar 2013 játtaðar kr. 250.000,- til arbeiðið.
Sostatt er metti fíggjartørvurin til at dagføra niðara part av Dvørgastígi, kr. 1.231.000,-, tá undanfarin játtan til skitsuprosjektering er íroknað.

Ad2.
Út frá fyriliggjandi skitsuuppskoti verður mett, at samlaðu útreiðslurnar at dagføra allan Dvørgastíg verða uml. kr. 3 mió. íroknað MVG (sí j. nr. 2013-0570/5). Arbeiðið fevnir um dagføring av øllum vegnum – íroknað fyribils atkomuveg frá Heiðagøtu meðan arbeiðið verður framt.

Áður eru við býráðssamtykt tann 23. februar 2013 játtaðar kr. 250.000,- til arbeiðið. Sostatt er metti fíggjartørvurin til at dagføra niðara part av Dvørgastígi, kr. 2.750.000,-, tá undanfarin játtan til skitsuprosjektering er íroknað.

Vísandi til samtykt í teknisku nevnd 6. februar 2013 og í býráðnum 21. februar 2013, verður skitsupppskot við kostnaðarmeting framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Skitsuuppskot og kostnaðarmeting varð framlagt.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til fígging av at dagføra niðara part av Dvørgastígi vísandi til at tað sambært íløguætlan kommununar fyri 2013 eru settar 1 mió. kr. til Dvørgastíg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fyrireika útbjóðing í innbodnari lisitatión av at dagføra niðara part av Dvørgastígi, at játta 1 mió. kr. av markaðum íløgum til vegir (§6, 8175 Dvørgastíg) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 25. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge, taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við teknisku nevnd og mælir býráðnum frá at samtykkja málið og í staðin loysa vegaatkomuna gjøgnum Heiðaveg.

**Býráðið 26. juni 2013:** Sjúrður Olsen legði vegna seg og Annfinn Brekkstein fram broytingaruppskot um at gera eitt skitsuppskot, sum tekur støði í at steingja Dvørgastíg frá Varðagøtu og at binda Dvørgastíg í Heiðaveg og at játta 1 mió. kr. av markaðum íløgum til vegir §6 8175 Dvørgastígur til arbeiðið.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið hjá Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus og Marin Katrina Frýdal.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið hjá fíggjarnevndini 26. juni 2013, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen og Jógvan Dam.

Ímóti atkvøddu: Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2006-1323

**FUNDUR LOKIN KL. 20.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |